Uttanríkis- og vinnumálaráðið

Dagfesting:	7. mars 2024
Mál nr.:	23/25395
Málsviðgjørt:	jd
Ummælistíð:	25. januar-22. februar 2024
Eftirkannað:	26.-27. februar 2024

Uppskot til

Løgtingslóg
um
burðardygga ferðavinnu
(Ferðavinnulógin)

Endamál

§ 1. Ferðavinna skal í øllum lutum skipast á burðardyggum grundarlagi til tess at verja náttúruna og at tryggja fólkaræði, frælsi, trivnað, inntøkur og vinnumøguleikar hjá fólkinum kring landið við at:

1) verja náttúru, tilfeingi og siðvenju,
2) styrkja staðbundin samfeløg, mentan og mentanararv,
3) styrkja samstarv millum ferðavinnu og aðrar vinnur, og
4) kunna um, hvussu farast skal fram í náttúruni, og hvussu ferðavinnan er skipað.

Stk. 2. Reglur, fyriskipanir, avtalur o.a. framt eftir hesi løgtingslóg skulu miða eftir at røkka hesum málum.

Allýsingar

§ 2. Í hesi løgtingslógini skulu hesi hugtøkini skiljast soleiðis:

1) Heimafólkið: Fólkið, sum býr á staðnum.
2) Handilslig ferðavinna: Skipaður túrur, har fyriskiparin tekur ímóti gjaldi fyri tiltakið. Fyriskipari eftir 1. pkt. kann vera persónur, felag o.tíl.
3) Innangarðs: Bøur og annað lendi innan fyri markið millum bø og haga, sum natúrliga verður fatað sum innangarðs, umframt annað velt lendi.
4) Uttangarðs: Óvelt lendi, sum ikki er fevnt av hugtakinum innangarðs, sum tað er lýst í nr. 3.
5) Strond: Rondin, sum myndar markið millum land og sjógv.
6) Bøndur: Festarar, jarðareigarar, hagastýri og røktingarmenn.
7) Ferðafólk: Fólk, sum hvørki hevur bústað ella fulla skattskyldu í Føroyum, og sum í sambandi við frítíð ella vinnu er burturi frá heimstaði sínum fyribils og í meira enn 24 tímar.

Rætturin at ferðast til gongu

§ 3. Við teimum avmarkingum og skyldum, sum eru ásettar í ferðavinnuætlanum sbrt. § 6 í hesi løgtingslóg, í reglum, givnar við heimild í hesi løgtingslóg, í øðrum løgtingslógum og lógum, kunnu ferðafólk ferðast til gongu undir egnari ábyrgd á bygdagøtum, uttangarðs og fram við strondini.

Atburður

§ 4. Øll, sum ferðast ella uppihalda sær á bygdagøtum, uttangarðs og fram við strondini, skulu hava fyrilit og fara væl um, so at tey ikki eru náttúru, fenaði, mentanararvi ella øðrum at skaða ella til ampa.
Stk. 2. Tað er bannað at taka gróður, lívverur, egg, steinar og grót við sær, tá ið ferðast verður uttangarðs.
Stk. 3. Bóndin hevur rætt at vísa burtur fólki, sum ber seg fyrilitarleyst at ella er ognini at skaða ella til ampa.

Handilslig ferðavinna

§ 5. Uttan mun til ásetingina í § 3 kann handilslig ferðavinna bara útinnast í samráð við bóndan.
Stk. 2. Ásetingin í stk. 1 gevur ikki bóndanum heimild at nokta fyri virksemi eftir stk. 1, sbr. tó § 12, stk. 3, ella at geva fyriskiparum einkarætt, men hann kann krevja, at avtala um virksemi eftir stk. 1 er gjørd frammanundan.
Stk. 3. Landsstýrisfólkið ásetur nærri reglur um innihaldið í avtalum fyri virksemi eftir stk. 1.

Ferðavinnuætlan

§ 6. Allar kommunur skulu, saman við serstøku nevndini, sbr. § 7, og hagastýrum og festarum, gera eina ferðavinnuætlan, har ferðavinnuvirksemið í kommununi verður greinað, eins og gerast skal ein ætlan fyri, hvussu ferðavinnan á staðnum verður ment og fyriskipað soleiðis, at hon í minst møguliga mun ger seg inn á náttúru, djóralív, heimafólk, mentan og mentanararv samsvarandi endamáli løgtingslógarinnar. Ferðavinnuætlanin skal røkka út á kommunumark, men kommunur kunnu samstarva um at gera ferðavinnuætlanir fyri natúrligt avmarkað øki.
Stk. 2. Landsstýrisfólkið ásetur nærri reglur um, hvat ferðavinnuætlanin skal innihalda, eins og ásett kunnu verða krøv til ferðaleiðarar.
Stk. 3. Ferðavinnuætlanin, sum skal góðkennast av landsstýrisfólkinum, skal vera liðug í seinasta lagi 1. juni 2025.

Serstøk nevnd hjá heimafólki

§ 7. Til tess at tryggja, at fyrilit verður havt fyri heimafólkinum, tá ferðavinnuætlan eftir § 6 verður gjørd, verður í bygdum, sum hava 300 íbúgvar ella færri, vald ein nevnd við minst trimum og í mesta lagi sjey fólkum.
Stk. 2. Nevndarlimirnir verða valdir millum heimafólkið á grannastevnu sbrt. Lov for Færøerne om Grandestævne m.m., sbr. tó stk. 3 og 4.
Stk. 3. Ein og hvør, sum hevur bústað í bygdini, og sum er 18 ár ella eldri, kann stilla upp til nevndina og hevur atkvøðurætt. Valið verður avgjørt við vanligum meiriluta millum tey, ið valt hava.
Stk. 4. Uttan mun til ásetingarnar í § 4 í Lov for Færøerne om Grandestævne m.m. um, nær grannastevna verður hildin, skal sýslumaðurin skipa fyri grannastevnu áðrenn 1. september 2024, har nevndin verður vald fyrstu ferð.

Farleiðir

§ 8. Kommunan skal í samráð við bóndan, viðkomandi myndugleikar og stovnar merkja upp farleiðir og, við loyvi frá náttúrufyrisitingini, gera nýggjar farleiðir til tess at skipa ferðsluna uttangarðs.
Stk. 2. Kommunurnar hava ábyrgd av at halda farleiðirnar, nevndar í stk. 1, umframt tær gomlu bygdagøturnar.

Stk. 3. Landsstýrisfólkið við náttúrumálum kann áseta nærri reglur fyri, hvussu farast skal fram, tá ið farleiðir verða gjørdar.

Skilhaldsreglur

§ 9. Til at skipa gongdina í økjum, har ið nógv fólk ferðast, ásetur kommunan í samráð við bóndan og heimafólkið skilhaldsreglur, sum øll, sum ferðast í økinum, skulu fylgja. Skilhaldsreglurnar kunnu m.a. hava til endamáls at verja náttúru og mentanararv, at tryggja frið, skil og reinføri og tryggja, at gongdin ikki darvar landbúnaðinum í órímiligan mun. Skilhaldsreglurnar skulu ikki avmarka rættin at ferðast meira enn neyðugt.
Stk. 2. Landsstýrisfólkið skal góðkenna skilhaldsreglurnar og lýsa tær í kunngerð.

Yvirtøka

§ 10. Røkka skilhaldsreglur eftir § 9 ikki til at tryggja, at ávíst øki kann brúkast til tað endamál, sum tað varð brúkt til frammanundan, kann eigarin krevja, at landið yvirtekur økið móti fullum gjaldi.
Stk. 2. Áheitan um yvirtøku eftir stk. 1 verður viðgjørd eftir reglunum í Lov om Forpligtelse til Jords Afgivelse til offentlige Veje, Havne og Landingssteder, samt til offentlige Skoler på Færøerne.
Stk. 3. Er talan um festijørð, verður málið avgreitt eftir ásetingunum í løgtingslóg um landsjørð.

Trygd

§ 11. Landsstýrisfólkið kann áseta reglur um, at tað í økjum, har serliga vandamikið er at ferðast, bara skal vera loyvt at ferðast við staðkendum fólki.
Stk. 2. Landsstýrifólkið kann áseta, at serliga vandamikil øki av trygdarávum skulu vera heilt ella partvíst stongd fyri ferðslu ávísa tíð á árinum ella samdøgrinum.

Ólógligar forðingar o.tíl.

§ 12. Ikki er loyvt bóndanum við gjaldportri, stongsli ella á annan hátt at forða fyri lógligari atgongd ella gera tað trupult hjá fólki at útinna síni rættindi eftir hesi løgtingslógini.
Stk. 2. Bóndin kann ikki uttan serstaka heimild við skelti ella á annan hátt kunngera forboð fyri lógligari ferðslu og uppihaldi.
Stk. 3. Bóndin kann, hóast ásetingarnar í stk. 1 og 2, avmarka ferðslu og uppihald, sum órógva landbúnaðarvirksemi ella veiðu, t.d. fjallgongu og haruveiðu. Avmarkingin eftir 1. pkt. skal vera so avmarkað sum gjørligt.
Stk. 4. Landsstýrisfólkið ásetur nærri reglur um, hvussu slíkar avmarkingar verða almannakunngjørdar.

Burturtøka

§ 13. Politiið kann krevja, at ólógligar forðingar sbrt. § 12, stk. 1 og 2, verða tiknar burtur, og at onnur viðurskifti, sum ikki eru í samsvari við hesa løgtingslóg ella reglur, givnar við heimild í hesi løgtingslóg, verða fingin í rættlag.
Stk. 2. Verða boð eftir stk. 1 ikki aktað, verður burturtøkan framd fyri ábyrgdarans rokning. Kravið kann krevjast inn við panting.

Burðardygdargjald

§ 14. Øll ferðafólk, 16 ár og eldri, sum koma til Føroya, rinda eitt burðardygdargjald upp á kr. 225.
Stk. 2. Fyritøkur, flutningsfeløg o.o., sum flyta fólk til landið, og havnir, sum taka ímóti cruise-skipum, stuttleikabátum o.tíl., krevja gjaldið inn vegna landið og avrokna gjaldið til TAKS sum ásett í § 1, stk. 3, í løgtingslóg um ferðagjald.
Stk. 3. Landsstýrisfólkið ásetur nærri reglur um, hvussu fyritøkur, flutningsfeløg havnir o.o. krevja gjaldið inn.

§ 15. Burðardygdargjaldið verður goldið kommununum og er markað til at gera og halda viðlíka farleiðir eftir § 8, umframt til

onnur átøk, sum skipa ferðavinnuna í einstøku bygdunum í kommununi, sbr. tó stk. 2 og 3.
Stk. 2. Kommunurnar skulu stuðla serstøku nevndini eftir § 7 við einum fjórðingi av gjaldinum, so nevndin kann fyrireika ferðavinnuætlanir, átøk og tiltøk, sum skipa ferðavinnuna í bygdini. Eru fleiri serstakar nevndir, sbr. § 7, í kommununi, verður fjórðingurin býttur javnt millum nevndirnar.
Stk. 3. Kommunurnar skulu stuðla hagastýrum og festarum við einum fjórðingi av gjaldinum, so hesi kunnu fyrireika ferðavinnuætlanir, átøk og tiltøk, sum skipa ferðavinnuna uttangarðs.
Stk. 4. 40% av gjaldinum, nevnt í stk. 1, verður býtt javnt millum allar kommunur. Hini 60% verða býtt við støði í ferðavinnuhagtølum og teljingum, so kommunur við lutfalsliga flest ferðafólkum fáa lutfalsliga mest av gjaldinum.
Stk. 5. Har gøtur annaðhvørt eru gjørdar ella eru í gerð, er loyvt tí, sum hevur staðið ella stendur fyri arbeiðinum, at krevja gjald til tess at fíggja kostnaðin av hesi gøtu.

Revsing

§ 16. Er ikki hægri revsing ásett í aðrari lóggávu, verður við sekt revsaður tann, sum brýtur ásetingarnar í § 4, stk. 1 og 2, § 5, stk. 1, og § 12, stk. 1 og 2.
Stk. 2. Tann, sum ikki aktar boð um burturvísing eftir § 4, stk. 3, verður revsaður sbrt. § 264, stk. 1, nr. 2 í revsilógini.
Stk. 3. Við sekt verður revsaður tann, sum ikki heldur skilhaldsreglur, ásettar eftir § 9, ella ikki aktar boð eftir § 13, stk. 1.
Stk. 4. Í reglum, givnar við heimild í hesi løgtingslógini, kann verða ásett, at brot á reglurnar verða revsað við sekt.
Stk. 5. Revsiábyrgd kann verða áløgd løgfrøðiligum persónum eftir reglunum í 5. kapitli í revsilógini.

Gildiskoma o.a.

§ 17. Henda løgtingslóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd, sbr. tó stk. 2, og samstundis fer úr gildi reglugerð fyri varðavegir frá 29. oktober 1940.
Stk. 2. §§ 14 og 15 fáa gildi 1. oktober 2024. § 18 fær gildi 1. januar 2026.
Stk. 3. Ásetingin í § 15, stk. 5, fer úr gildi 1. juni 2025.

Broyting í aðrari lóggávu

§ 18. Í løgtingslóg nr. 37 frá 26. mai 1988 um ferðagjald, sum broytt við løgtingslóg nr. 118 frá 3. oktober 1988, løgtingslóg nr. 56 frá 5. mai 1994, løgtingslóg nr. 98 frá 29. desember 1998, løgtingslóg nr. 121 frá 1. desember 2003, løgtingslóg nr. 49 frá 16. mai 2006 og løgtingslóg nr. 33 frá 6. mai 2013, verður í § 3 sum stk. 2 sett: "*Stk. 2*. Ásetingin í nr. 2 er ikki galdandi fyri ferðafólk við cruise-skipum."

§ 19. Í Lov nr. 171 af 18. maj 1937 for Færøerne om Hegn og Markfred, sum broytt við løgtingslóg nr. 25 frá 31. mars 1949, løgtingslóg nr. 30 frá 17. mars 1951, løgtingslóg nr. 242 frá 7. juni 1963, lovbekendtgørelse nr. 555 af 1. november 1984, og § 25 í løgtingslóg nr. 91 frá 7. juni 2020, verða gjørdar hesar broytingar:

1) Í § 41 verður aftan á 1. pkt. sum nýtt pkt. sett: "Ásetingin í 1. pkt., 1. liði, er ikki galdandi fyri íbúgvar landsins, sum tí hava frítt at fara."

2) § 42, 1. pkt., verður orðað soleiðis: "**§ 42**. Í landbúnaðarørindum er loyvt at ganga gjøgnum fremmandan haga í hesum førum:".

Kapittul 1. Almennar viðmerkingar

1.1. Orsakir til uppskotið

Í 2011 varð farið undir veruliga skipaða marknaðarføring av Føroyum sum ferðamannalandi. Endamálið var at økja inntøkuna av ferðavinnuni soleiðis, at ferðavinnan kundi gerast eitt týðandi ískoyti til samfelagsbúskapin. Henda marknaðarføring hevur eydnast væl, og ferðafólkatalið er vaksið nógv seinastu árini. Vaksandi ferðafólkatalið hevur kortini eisini gjørt greitt, at tørvur er á at skipa ferðavinnuna á ein slíkan hátt, at hon í størst møguligan mun verjir náttúruna, mentanina, frælsið hjá fólkinum í landinum, grundleggjandi virði í samfelagnum og er fólki og landi til gagns.

Tað er ein royndur lutur, at ferðavinnan kring allan heim hevur somu avbjóðingar. Hon leggur trýst á náttúru og mentan, og fólk gerast lutir og áskoðarar í egnum landi. Vandin fyri ídnaðargerð er stórur, og ferðavinnan elvir til stríð um vald og rættindi. Men ferðavinna *er* í Føroyum, og tí er tað neyðugt at skipa viðurskiftini á skynsamasta hátt, skal støðan í Føroyum ikki gerast tann sama sum í øðrum londum, har ferðavinnan hevur fleiri negativ árin enn positiv.

Verandi ferðavinna í Føroyum hevur økt tilvitið um egna náttúru, mentan og tilfeingi, eins og hon hevur skapt vinnumøguleikar í útjaðaranum og á smærri plássum kring landið. Og – við virðing fyri náttúruni, mentanini og staðbundnu samfeløgunum kring landið – kann ferðavinnan skapa búskaparligar og vinnuligar møguleikar fyri land og fólk. Hetta er kortini treytað av, at ferðavinnan byggir á, at vinna, ognarskapur og inntøkur eru í Føroyum og í staðbundnu samfeløgunum kring landið, og at okkara gestum verður tryggjað skipaðar og virðiligar umstøður og frælsi við ábyrgd.

Ferðavinna sum møguleiki, avbjóðing og stríð

Um allan heim hevur ferðavinna skapt møguleikar, men hevur somu avbjóðingar og stríð við sær. Í Føroyum hevur ferðavinnan skapt nýggjar vinnumøguleikar, størv og inntøkur. Hon hevur økt tilvitið um og virðingina fyri okkara viðbreknu náttúru. Hon hevur økt virðingina fyri okkara ríka livandi tilfeingi á landi og sjógvi við mati í heimsflokki. Hon hevur ment virðingina fyri okkara mentan, list, mentanararvi og søgu og skapt betri grundarlag fyri livandi mentanarlívi og upplivingum. Hon hevur givið okkum munandi betri samferðslumøguleikar til útheimin. Hon kann skapa betri samferðslu innanlands. Hon hevur elvt til og kann skapa nýggjar vinnumøguleikar kring landið og á smáplássum og samstarv millum landbúnaðarvinnu og ferðavinnu. Hon hevur økt og kann økja um útbúgvingarmøguleikar, menning og nútímansgering hjá okkum sum tjóð í heiminum.

Men ferðavinna um allan heim hevur elvt til – og hevur – grundleggjandi avbjóðingar og stríð, sum vit kenna aftur hjá okkum og sum vit eiga at læra av og vera sera tilvitað um: Ferðavinna leggur trýst á náttúru og mentan. Hon kann gerast ídnaðargjørd hópferðavinna, har altjóða fyritøkur stýra og taka vinningin. Hon kann elva til stillstøðu í egnari mentan og søgu, har fólk gerast áskoðarar og lutir í einum sýnisglugga í egnum landi. Hon kann skapa sosialar ójavnar og vantandi rættindi hjá teimum, sum starvast í vinnuni. Hon kann kann skerja frælsið og trivnaðin hjá fólkinum í landinum og ikki minst á plássum, har ferðafólkatal veksur munandi. Hon kann elva til miðsavnan og einkarætt í vinnu og búskaparligum møguleikum. Hon kann trýsta og broyta aðrar vinnur og siðvenjur, sum eru bygdar upp gjøgnum ættarlið og kann elva til framíhjárættindi hjá summum.

Og ferðavinna skapar stríð um vald og rættindi: Um atgongd at náttúruni og teimum virðum, sum samfeløg og tjóðir hava skapt gjøgnum ættarlið. Um vinnurættindi, skipanir,

avgerðarrætt og vandar fyri einkarætti. Um pening, inntøkur og vinning. Um frælsið og fólkaræðið og trivnaðin hjá fólkinum í landinum.

Hesir møguleikar, stríð og avbjóðingar, ið eru kend um allan heim, hava verið alt meira eyðsýnd og hava myndað orðaskiftið og politisku viðgerðina av ferðavinnuni í Føroyum seinastu árini.

Tískil er alneyðugt, at vit í Føroyum eru fyrivarin, umhugsin og læra av royndum og avbjóðingum í heiminum og heima hjá okkum. Vit eiga at skipa ferðavinnuna og viðurskiftini á skynsamasta hátt, so ferðavinnan kann byggja upp og hava kjølfesti og undirtøku í okkara samfelag – ja, at hon enntá kann bøta um og endurbøta viðurskifti, ið vit ikki hava givið nóg stóran ans frammanundan.

Málini og víðsjónirnar fyri ferðavinnu í Føroyum
Til tess at ferðavinnan kann gerast ein týðandi og væl skipað vinna í Føroyum skal hon:

- Kjølfestast í grundhugsanini um, at gestir koma heim til okkara: Til okkara land og tjóð, mentan, søgu og samfelag, fjølbroyttu pláss og ymsu heim, og hon skal styrkja og menna tey
- Verja, lynna undir og endurbøta burðardygga náttúrunýtslu, livandi mentan og virðing fyri okkara landi og fólki
- Byggjast á, at vinna, ognarskapur og inntøkur eru í Føroyum og í staðbundnum samfeløgum.
- Samvirka við og skapa nýggjar vinnumøguleikar hjá øðrum vinnum og landbúnaðinum og ikki elva til framíhjárættindi og einkarætt
- Grundast á virðing fyri frælsi, fólkaræði og trivnaði hjá fólkinum í Føroyum
- Tryggja skipaðar, virðiligar umstøður og frælsi við ábyrgd og skyldum hjá okkara gestum, sum skulu verða væl kunnaðir og upplýstir
- Stuðla undir fremstu vitan og skipanir og okkara egnu fatan og ábyrgd fyri at virða, verja og menna náttúru, tilfeingi, mentan, søgu, samfelagsvirði og rættindi

Semjur, samstarv og gongdar leiðir
Greitt er, at ferðavinnan hevur elvt til ósemjur og viðgerð av grundvallarspurningum. Kortini hevur drúgv viðgerð í politisku skipanini og teir mongu hoyringarfundirnir, ið hava verið um lóggávu og skipan, viðgjørt gongdar leiðir.

Tí byggir lógaruppskotið á hesar grundleggjandi tættir, ið kunnu elva til semjur og samstarv í landinum um burðardygga ferðavinnu:

- Fólkið í Føroyum skal ikki gjalda fyri at ferðast og njóta náttúruna í egnum landi við fyriliti og ábyrgd
- Ferðafólk (turistar) mugu taka lut í at gjalda fyri at verja náttúru, undirstøðukervi, mentan og staðbundin samfeløg í landinum
- Landbúnaðarvirksemi, siðvenjur og skipanir mugu virðast, tryggjast og órógvast minst møguligt
- Fólk gjalda sjálvsagt fyri vinnuligar fyriskipaðar tænastur og ferðir í náttúruni
- Gerast skulu lokalar ferðavinnuætlanir, saman við fólki á staðnum, har ásett verður, hvar ferðafólk kann ferðast frælst, men undir ábyrgd, í náttúruni, hvar og nær tey ikki

kunnu, og hvar ferðast skal við ferðaleiðara, møguliga staðkendum ferðaleiðara, og hvussu mong ferðafólkini kunnu vera á ávísum plássum og støðum

Burðardygd og avbjóðingar
Hugtakið *burðardygd* er tað mest grundleggjandi, tá ferðavinnan verður skipað. Rætt er, sum fleiri hoyringarpartar hava vist á, bæði á fundum og í skrivum, at ferðavinna í einum oyggjasamfelag altíð hevur við sær útlát av veðurlagsgassum av ferðing og økt trýst á náttúru. Tó *er* ferðavinna í Føroyum og kring allan heim, og tískil er endamálið at skipa hana sambært teimum mest burðardyggu málunum og skipanunum.

Í hesi lóg verður denturin lagdur á burðardygd í hesi merking:

- *Burðardygd í náttúru og tilfeingisnýtslu,* ið altíð má standa fremst, har vit verja náttúruna og alt sum er og livir í henni við fremstu vitan og amboðum
- *Burðardygd í mentan,* har vit verja mentanararv, søgu og virði og kunnu skapa, endurskapa og menna mentanarlig virði
- *Sosial og samfelagslig burðardygd,* har vit tryggja og menna sosial rættindi, vælferð og virði
- *Fólkaræðislig burðardygd,* har vit tryggja, at avgerðirnar verða tiknar við fólkaræðisligari viðgerð og rættindum
- *Búskaparlig og vinnulig burðardygd,* har vit tryggja sunnan búskap og inntøkur og vinnufrælsi, har ikki framíhjárættindi og einkarættur skapast

Náttúruvernd, landbúnaður og ferðavinna
Tá ið ræður um at verja náttúruna, má ásannast, at nógv liggur á láni, men við nýggju náttúruverndarlógini, sum kom í gildi 1. januar 2024, fáast betri og fjølbroyttari amboð at verja hótta og serstaka náttúru við. Summi øki í føroysku náttúruni eiga at verða skipað sum serlig verndarøki eftir náttúruverndarlóggávuni, og í tí sambandi kunnu reglur eisini verða ásettar, sum skipa, avmarka ella banna gongd í økjunum. Slíkar reglur í friðingarúrskurði ella friðingarkunngerð galda fram um tann vanliga rættin at ganga í haganum og fram við strondini. Ferðavinnuvirksemi má tí eisini víkja fyri tiltøkum og átøkum, sum verja náttúruna, hóast hesi tiltøk og átøk avmarka ella steðga vinnuligum ferðavinnuvirksemi.

Tá gingið verður uttangarðs og fram við strondini er umráðandi at ansa eftir, at farið verður fram við neyðugum fyriliti fyri náttúruni og tí virkseminum, ið har er. Virksemi og atburður, sum eru náttúruni til órímiligan ampa ella skaða, eru tí ikki fevnd av tí lógliga ferðslurættinum. Vísast kann í hesum sambandi eisini á ásetingina í § 4 í náttúrverndarlógini, sum snýr seg um eina almenna fyrilitsskyldu. Ásett verður, at øll hava skyldu til at fara fram við fyriliti og gera tað, sum rímiligt er, so náttúrumargfeldið ikki verður fyri skaða.

Rætturin at ferðast uttangarðs og fram við strondini er sostatt eitt útgangsstøði, sum eins og øll onnur nýtsla av náttúruni verður at víkja fyri avmarkandi verndartiltøkum eftir náttúruverndarlóggávuni. Hesin rættur skal somuleiðis útinnast við neyðugum fyriliti fyri landbúnaðarvirkseminum hjá tí, sum eigur ella varðar av jørðini. Tann, sum er slíkum virksemi til órímiligan ampa ella skaða, fer tí eisini út um sín lógliga ferðslurætt.

Í grannalondunum, sum Føroyar kappast við í ferðavinnuhøpi, er loyvt at veita ferðaleiðaratænastur uttangarðs uttan at rinda fyri atgongd. Tað tænir tí almennum vinnu- og ferðavinnuáhugamálum, at hetta eisini er loyvt í Føroyum, so at ein og hvør, sum hevur hug og hegni, kann fara undir slíka vinnu. Gjald til jarðareigaran – bara fyri atgongd at lendinum

– er fyri tænastuveitarar at rokna sum ein vinnuforðing, sum ger tað tyngri at fáa ferðavinnutænastur úti um landið at bera seg og mennast, og samfelagsbúskaparliga er slík vinnuforðing hvørki skynsom ella gagnlig.

Ferðavinnan er ein gyltur møguleiki at skapa virksemi og trivnað í útjaðaranum, har ið møguleikarnir frammanundan er ógvuliga avmarkaðir. Løtt og ókeypis atgongd at náttúruni gevur kvinnum og monnum í útjaðaranum bestu fyritreytir at veita ferðavinnutænastur.

Bøndur og jarðareigarar kenna sum vera man síni egnu øki best og hava tí ríkar møguleikar at bjóða slíkar tænastur, umframt at teir kunnu brúka sjálvan landbúnaðin í ferðavinnuhøpi.

1.2. Galdandi lóggáva

Eingin yvirskipað lóg er um ferðavinnu í Føroyum.

Galdandi lóggáva fevnir ikki um gongd í náttúruni í frítíðini. Ásetingar um at ferðast uttangarðs eru kortini í Lov om Hegn og Markfred frá 1937 (girðingarlógin), men hesar ásetingar snúgva seg mest um at verja landbúnaðin fyri órógvan. Galdandi ásetingar leggja ikki upp fyri, at frítíðarvirksemið er munandi broytt við tíðini, og at tað er vorðið vanligt at ganga í haganum uttan at hava beinleiðis ørindi, ið eru knýtt at landbúnaðinum. Gamla lógin frá 1937 er ikki nóg mikið til at regulera økið, og tí er umráðandi at fáa nýggja og tíðarhóskandi lóggávu, ið hevur fyrilit fyri bæði landbúnaðinum, náttúruni, ferðavinnuni og gongd í haga.

Rættindini hjá bóndum í náttúruni eru knýtt at landbúnaði, og lóggávan á økinum stavar frá eini tíð, har hagin ikki varð brúktur til onnur endamál. Landbúnaðarlóggávan er ikki ætlað at skipa gongd í náttúruni, sum einki hevur við landbúnað at gera, og hóskar heldur ikki til tað. Tí er tørvur á nýggjari lóggávu, sum við støði í nútíðini leggur upp fyri teimum ymisku fyrilitunum, sum í dag eru viðkomandi.

Rætturin at njóta náttúruna, ognarrætturin og grundlógin
Uttangarðsrættindi hjá almenninginum hava í øldir verið ásett við lóg. Seinast í girðingarlógini frá 1937, sum út í æsir ásetur rættindini hjá almenninginum at ferðast uttangarðs. Lóggevari hevur sostatt mett, at talan hevur verið um atgongd og tilfeingi, sum er so týðandi, at tað er lóggevarin, sum skal gera av, hvussu atgongdin er skipað og hvussu tilfeingið verður umsitið.

Av tí at rættindini hjá almenninginum hava verið ásett við lóg, hava bøndur ikki havt ræði at ráða yvir gongd hjá almenninginum í haganum. Sambært § 3 í Lov nr. 172 av 18. maj 1937 for Færøerne om Haugers Styrelse og Drift m.m. (hagalógin) hevur hagafundurin hinvegin ræði at áseta reglur fyri ferðslu hjá bóndum.

Eins og lóggávuvaldið gjøgnum øldirnar hevur vigað ymisk fyrilit, m.a. fyri bóndum og landbúnaði og tørvinum hjá almenninginum, og ásett, hvat ið galda skal, er tíðin nú búgvin til, at Løgtingið við støði í dagsins samfelag og dagsins tørvi vigar viðkomandi fyrilit og ásetur, hvat ið galda skal. Tað skerst ikki burtur, at samfelag og tørvir eru nógv broytt, síðan lóggávuvaldið seinast ásetti reglur fyri viðurskiftunum í hagalógini frá 1866, t.e. Lov af 23. februar 1866 om Ordning af de til Haugevæsenet paa Færøerne hørende Forhold. Tær ásetingarnar vórðu í høvuðsheitum endurtiknar óbroyttar í girðingarlógini frá 1937.

Har ið almenninginum einaferð serliga tørvaði ávís nyttu- og ferðslurættindi uttangarðs, t.d. rætt til torvskurð og at ferðast millum bygda, tørvar almenninginum í dag fyrst og fremst atgongd at náttúruni. Hetta at tryggja almenninginum atgongd at náttúruni stendur ovarlaga á breddanum í flestum grannalondum sum týðandi samfelagsáhugamál, og í øllum grannalondum eru rættindini hjá almenninginum til atgongd at náttúruni tryggjað við lóg.

Landbúnaðurin hevur í øldir átt rætt at gagnnýta uttangarðsjørðina til landbúnaðarendamál eftir reglunum í landbúnaðarlóggávuni. Henda er at kalla ikki broytt eftir 1937, tá ið verandi landbúnaðarlógir fingu gildi, t.e. serliga Lov nr. 171 af 18. maj 1937 for Færøerne om Hegn og Markfred (girðingarlógin) og Lov nr. 172 af 18. maj 1937 for Færøerne om Haugers Styrelse og Drift m.m. (hagalógin), umframt Lov nr. 170 af 18. maj 1937 for Færøerne om Grandestævne m.m. (grannastevnulógin) og Lov nr. 169 af 18. maj 1937 for Færøerne om Benyttelse af Indsøer og Vandløb.

Tá ið henda landbúnaðarlóggávan varð skrivað fyrst í tjúgundu øld, vóru Føroyar eitt heilt annað samfelag enn í dag, og lóggávan snýr seg tí bara um landbúnaðarviðurskifti. Galdandi lóggáva leggur tí ikki upp fyri teimum stóru samfelagsbroytingunum, sum hendar eru, síðani Føroyar fóru frá at vera eitt landbúnaðarsamfelag og til at vera eitt fiskivinnusamfelag, og tekur als ikki støðu til spurningin um rættin hjá fólki at njóta og uppliva náttúruna. Men hóast lóggávan ikki er dagførd, eru siðir broyttir. Og hóast Føroyar ikki sum hini Norðurlondini hava staðfest nakran rætt at ferðast í náttúruni, hava føroyingar gingið nógv í náttúruni í frítíðini. Tí er ósamsvar millum landbúnaðarlóggávuna øðrumegin og veruleikan og siðvenjuna, sum leingi hava verið galdandi, hinumegin. Lóggávuvaldið fær við hesum høvi til at taka støðu til ósamsvarið millum lóggávu og siðvenju og at greiða sambandið millum rættin hjá fólki at ganga í haganum og áhugamálini hjá landbúnaðinum.

Grundlógin ásetur í § 73, stk. 1, at *Ejendomsretten er ukrænkelig. Ingen kan tilpligtes at afstå sin ejendom, uden hvor almenvellet kræver det. Det kan kun ske ifølge lov og mod fuldstændig erstatning.*

Tá ið talan er um fastogn, fevnir ognarrætturin um rættindini, sum eru knýtt at fastognini, og ognarrætturin gevur eigaranum rætt at ráða yvir ognini innan fyri lógarásettar karmar. Ognarhugtakið í § 73 í grundlógini er ógvuliga breitt, men verður grundleggjandi avmarkað við lóggávu. Tað er ein høvuðstáttur í ognarrættinum, at ein eigari hevur framíhjárætt at ráða yvir síni ogn. Hesin ræðisrætturin er heimilaður í sjálvum ognarrættinum. Ræðisrætturin kann kortini avmarkast við lóg ella avtalu. Verður ræðisrætturin hjá einum eigara avmarkaður við lóg, er talan er um inntriv í ognarrættin, men tað merkir ikki, at slík inntriv altíð eru at rokna sum ognartøka.

§ 73 í grundlógini verjir eigarar fyri at noyðast at lata ogn av hondum. Ognarhugtakið í grundlógini er sum nevnt ógvuliga breitt, og afturímóti mugu eigarar eftir umstøðunum lata sær lynda ógvuliga víðfevnda regulering av ognarrættinum, uttan at ognin fyri tað kann sigast at vera latin av hondum sambært grundlógini. Nógv tað mesta av allari regulering av ognarrættinum gevur ikki eigaranum rætt til endurgjald, og tað er eitt nú staðfest í danskari rættarvenju, at talan ikki var um ognartøku, tá ið reglur um atgongd at ferðast á privatum strondum og í privatum skógum vórðu settar í gildi í Danmark í 1969. Hesin spurningur varð royndur í tveimum rættarmálum, og í báðum førum staðfesti rætturin, at talan ikki var um ognartøku sambært § 73 í grundlógini. Eystari landsrættur staðfesti, at talan ikki var um ognartøku, men um vanliga regulering av ognarrættinum. Henda staðfestingin var grundað á,

at lóggávan var saklig og galdandi fyri allar eigarar, og at inntrivið í ognarrættin varð mett at vera so mikið veikt, at eigararnir ikki mistu ræði á ognini.

At lógarfesta ein rætt at ferðast í føroysku náttúruni er til samanberingar eisini ein generell regulering, sum verður galdandi fyri allar eigarar. Talan er ikki um at flyta rættindi frá eigaranum, og inntrivið er veikt, serliga tá ið havt verður í huga, at vit í nógv ár hava havt eina siðvenju við at kalla fríari gongd í haganum og fram við strondini. Alt hetta talar ímóti, at talan er um ognartøku, og tað ber tí til at tryggja rættin at ferðast uttangarðs og fram við strondini uttan at talan er um ognartøku, sum kemur tí almenna undir endurgjaldsskyldu.

Tá ið talan er um uttangarðsjørð, hevur ognarrætturin søguliga verið ein rættur at brúka jørðina við lunnindum til landbúnað. Hesin rætturin er ásettur við lóg og kann broytast við lóg. Skuldi ognarrætturin uttangarðs verið víðkaður til at fevna um annað enn landbúnað, hevði tað verið at víðkað ognarrættin meira, enn galdandi lóggáva heimilar. At viðurkent ein rætt hjá jarðareigarum at selja atgongd at uppliva náttúruna hevði somuleiðis verið at víðkað ognarrættin á ein hátt, sum er ókendur um okkara leiðir.

Hetta at tryggja fólki atgongd at náttúruni og landinum møguleika at gagnnýta náttúruna í ferðavinnumenningini er eitt týðandi alment samfelagsáhugamál. Sambært rættarvenju skulu inntriv í ognarrættin, sum ikki gera seg munandi inn á verandi virksemi, og sum eru grundað á týðandi almenn samfelagsáhugamál, tolast uttan endurgjald.

Bøndur hava rætt at brúka sína jørð til landbúnað, men øll eiga vit náttúruna og náttúruupplivingarnar. Tí verður eins og í øðrum Norðurlondum miðað eftir eini tíðarhóskandi loysn, sum uttan gjøld ella aðrar forðingar tryggjar okkum atgongd at njóta og uppliva náttúruna við neyðugum fyriliti fyri bæði náttúruni sjálvari og landbúnaðinum.

1.3. Endamálið við uppskotinum

Yvirskipaða endamálið er enn sum áður at gera ferðavinnuna til eitt týðandi íkast til samfelagsbúskapin. Skal hetta málið røkkast, er neyðugt at semjast um og kjølfesta grundhugsanina um, at gestir koma heim til okkara at vitja. Gestirnir koma forvitnir og spentir til okkara land og tjóð, okkara mentan, søgu og samfelag. Gestirnir koma eisini til okkara fjølbroyttu, spennandi og avbjóðandi náttúru, og tað liggur á okkum at verja hesa viðkvomu náttúru. Ferðavinnan skal eisini verja og lynna undir burðardygga náttúrunýtslu, livandi mentan og virðing fyri okkara landi og okkara staðbundnu samfeløgum.

Meiri umráðandi enn inntøkan av ferðavinnuni er tað tí at tryggja, at náttúran verður vird og vard. Hetta verður gjørt við at skipa soleiðis fyri, at gongd uttangarðs verður løgd til rættis á mest skynsama hátt við gøtum og leiðum, ið ávirka annað virksemi sum minst. Ferðafólk, sum koma til Føroya, skulu rinda eitt burðardygdargjald (sustainability fee), sum verður brúkt til at fíggja kostnaðin av hesum undirstøðukervi. Íbúgvar landsins rinda skatt og skulu tí ikki rinda hetta gjaldið.

Uppgávan at tryggja, at ferðafólk veruliga eru kunnug við, hvussu ferðavinnan í Føroyum er skipað, og hvussu ferðafólk skulu bera seg at, liggur í fyrsta liði hjá Visit Faroe Islands, sum hevur yvirskipaðu altjóða marknaðarføringina um hendur. Sama uppgáva er í øðrum liði eisini hjá landinum, hjá kommununum og hjá ferðavinnuni sjálvari, sum øll – hvør á sínum stað og á ymsan hátt – skulu fortelja søguna um Føroyar, og hvussu vit tryggja, at ferðavinnan er vistfrøðiliga, samfelagsliga, sosialt og búskaparliga burðardygg.

Stórur dentur eigur at leggjast á at kunna vitjandi ferðafólk um, hvørjar reglur eru galdandi fyri at ferðast í náttúruni og annars um virðing og hóskandi atburð.

Umráðandi er at bera so í bandi, at annað virksemi, t.e. í hesum føri serliga landbúnaður, verður órógvað sum minst, og tí verður skotið upp at gera farleiðir og gøtur og leggja (nýggjar) leiðir soleiðis, at neyðugt fyrilit verður havt fyri hesum, og skilhaldsreglur verða gjørdar. Kommunurnar skipa fyri hesum arbeiði í samráð við heimafólkið og jarðareigararnar, sum kenna umstøðurnar á staðnum best.

Undir liðini á gøtum og leiðum, sum eru ókeypis hjá einum og hvørjum at brúka, er tað, sum í hesum lógaruppskoti verður nevnt *handilslig ferðavinna*, sbr. serligu viðmerkingarnar til § 2.

Handilslig ferðavinna er ein tænasta, sum ein og hvør kann bjóða, og sum viðskiftafólkini rinda fyri. Eins og tá talan er um almennar farleiðir, skal farast fram við fyriliti fyri bæði fólki á staðnum og øðrum virksemi. Givið er, at talið av ferðafólkum aleina – føroyingum sum útlendingum – kann hava týðandi negativ árin ymsa staðni í landinum, og tí er umráðandi at leggja so væl til rættis sum gjørligt. Til ber t.d. at avmarka talið av ferðafólkum í hvørjum bólki, at áseta reglur um, hvussu boðað verður frá skipaðum túrum í ávísum økjum, at áseta krav um ferðaleiðara, sum í summum førum skal vera staðkendur, avmarkingar í tíð, bæði á árinum og á samdøgrinum o.a. Í hesum høpi er eisini umráðandi at viðurkenna, at hóast mesta virksemi er uttangarðs, so hevur hetta ávirkan á bygdina. Tað hevur tí týdning at skipa viðurskiftini á staðnum soleiðis, at ferðavinnuvirksemi darvar gerandisdegnum sum minst og verður eitt veruligt íkast til bæði verandi og nýggjar staðbundnar vinnur. Umráðandi at fáa í lag gott samstarv millum partarnar á staðnum, bæði bøndur, ferðasmiðir og heimafólkið annars.

Skal ferðavinnan mennast á skynsamasta hátt, er greitt, at tørvur er á støðugt at fylgja við og meta um, hvussu farið verður fram, eins og tað er umráðandi at hava í huga, at ferðavinnan í Føroyum skal spretta úr føroyskum jørðildi. Vit eiga øll okkara part í at trygga, at ferðavinnan hevur undirtøku millum fólkið, her býr, og at ferðavinnan veruliga verður fólki og landi til gagns, samstundis sum vit verja tað, sum ferðafólkini tráa eftir at uppliva – náttúru, land, fólk, mentan og søgu.

1.4. Samandráttur av nýskipanini við uppskotinum

Lógaruppskotið hevur til endamáls at skipa ferðavinnuna í Føroyum á burðardyggum grundarlag.

Til tess at tryggja, at ferðavinnan veruliga verður til gagns fyri landið, og til tess at tryggja at neyðugt fyrilit verður havt fyri náttúru, mentan og staðbundnu samfeløgunum kring landið, tá ið ferðavinnu umræður, verður ásett, at øll ferðafólk, t.e. tey, sum koma til Føroya í ferðavinnuørindum, eru við til at tryggja, at ferðavinnan er burðardygg, bæði í mun til náttúruna (vistfrøðilig burðardygd) og til staðbundnu samfeløgini (samfelagslig og sosial burðardygd). Við hesum fyrilitum kann ferðavinnan eisini vera búskaparliga burðardygg, t.e. at ferðavinnan ikki tekur tilfeingi úr samfelagnum, men heldur leggur afturat.

Lógaruppskotið hevur við sær, at gjald ikki kann verða tikið bara fyri at ganga í náttúruni. Lógaruppskotið avmarkar kortini ikki rættin hjá vinnurekandi móti gjaldi at skipa fyri túrum og øðrum tænastum í náttúruni. Fyriskiparar kunnu tí taka gjøld fyri egnar tænastur á vanligum marknaðargrundarlagi.

Lógaruppskotið skipar harumframt rættin hjá fólki at ganga í náttúruni. Ásett verður, at uttangarðs og fram við strondini kunnu øll ferðast til gongu, um fyrilit verður havt fyri náttúruni, umhvørvinum og landbúnaðarvirksemi í haganum, sbr. tó niðanfyri um ferðavinnuætlanir. Tað er sostatt ikki loyvt at nokta fólki atgongd at náttúruni, tá ið tað ikki er til ampa fyri landbúnaðarvirksemi. Eigarar kunnu tó avmarka ferðsluna, tá ið afturvendandi landbúnaðarvirksemi sum t.d. fjallgonga er fyri í haganum. Ferðslan skal tó ongantíð avmarkast meira enn neyðugt.

Lógaruppskotið áleggur kommunum at gera ferðavinnuætlanir fyri sítt øki út á kommunumark, men kommunur kunnu eisini samstarva um ferðavinnuætlanir fyri øki, sum fara tvørtur um kommunumark. Ferðavinnuætlanirnar skulu gerast í samráð við heimafólkið og bøndurnar og skulu hava til endamáls at skipa ferðavinnuna á staðnum á skynsamasta hátt.

Sum part av hesum skulu kommunurnar lýsa verandi gøtur, undir hesum eisini bygdagøtur og aðrar gøtur, ið eru tøkar hjá ferðafólki at brúka. Kommunan skal harumframt í samráð við viðkomandi myndugleikar, stovnar og bøndur merkja upp nýggjar farleiðir og gera gøtur til at beina ferðsluna, m.a. so at hon órógvar náttúru og landbúnað sum minst. Skylda kommunurnar at halda gomlu bygdargøturnar verður staðfest.

Til at skipa ferðsluna í økjum, har serliga nógv fólk ferðast, kann kommunan í samráð við heimafólk og bøndur áseta skilhaldsreglur fyri ferðslu. Landsstýrisfólkið skal góðkenna skilhaldsreglurnar.

Til tess at fíggja kostnaðin av at gera farleiðir og gøtur, gera og seta í verk ferðavinnuætlanir o.a. verður ásett, at hvørt ferðafólk, sum kemur til Føroya, skal rinda eitt burðardygdargjald. Gjaldið er sett til 225 kr.

Víst verður eisini til *punkt 1.1. Orsakir til uppskotið, pkt. 1.2. Galdandi rættur* og *pkt. 1.3. Endamálið við uppskotinum.*

1.5. Ummæli og ummælisskjal

Lógaruppskotið hevur verið til ummælis hjá Atlantic Airways, Bóndafelag Føroya, Ferðaleiðarafelagnum, Ferðavinnufelagnum, Føroya Náttúru- og Umhvørvisverndarfelag, Føroya Óðalsfelag, Kommunufelagnum, Smyril Line, TAKS, Vinnuhúsinum og Útoyggjafelagnum umframt hjá stjórnarráðunum.

Lógaruppskotið hevur harumframt verið til ummælis á heimasíðuni hjá Uttanríkis- og vinnumálaráðnum í tíðarskeiðinum 25. januar-23. februar 2024.

Aftur at hesum hava kunnandi fundir um lógaruppskotið verið hildnir á Giljanesi, í Havn, í Skúgvi, í Skálavík, í Mikladali, í Hovi, á Oyrarbakka og í Klaksvík. Á hesum fundum hava tilsamans verið fleiri enn 600 áhoyrarar. Framløgan, sum varð hildin á seinasti fundinum í Klaksvík, varð stroymd á netinum.

Inn komu 95 hoyringarsvar. Víst verður til hjálagda upprit um innkomnar viðmerkingar.

Kapittul 2. Avleiðingarnar av uppskotinum

2.1. Fíggjarligar avleiðingar fyri land og kommunur

Lógaruppskotið hevur við sær fíggjarligar avleiðingar fyri landið, av tí at ferðafólk við cruise-skipum frá 1. januar 2026 skulu rinda ferðagjald sbrt. løgtingslóg um ferðagjald.

Í lógaruppskotinum er harumframt ásett, at landið eftir áheitan frá eigaranum skal yvirtaka lendið, sum vegna ferðavinnu ikki longur kann brúkast til upprunaliga endamálið. Í slíkum førum verður landið at gjalda eigara fult gjald fyri lendið. Er talan um almenna jørð, t.e. festijørð, er talan um gjald fyri mista rakstrarinntøku og ikki um gjald fyri lendið sjálvt. Víst verður til serligu viðmerkingarnar til § 10.

Lógaruppskotið hevur fíggjarligar avleiðingar fyri kommunurnar, sum skulu gera og seta í verk eina ferðavinnuætlan, eins og kommunurnar kunnu fara at fáa útreiðslur til tess at røkka málunum í ferðavinnuætlanini, m.a. við fíggjarliga at stuðla ávikavist nevndum, valdar eftir § 7, og hagastýrum og festarum, so hesi kunnu fyrireika ferðavinnuætlanir, átøk og tiltøk, sum skipa ferðavinnuna í ávikavist bygdini og uttangarðs.

Málið er at fíggja sum mest av hesum útreiðslum við burðardygdargjaldinum, men í tann mun, hetta ikki røkkur, kann gerast neyðugt hjá kommununum at fíggja restina. Ilt er kortini at meta um, hvussu stórar hesar útreiðslur verða.

Í 2022 vitjaðu umleið 110.000 ferðafólk í Føroyum. Varliga verður mett, at ferðafólkatalið í 2026 fer at vaksa upp í 140-145.000 ferðafólk. Við einum burðardygdargjaldi upp á 225 kr. verður samlaða inntøkan góðar 33 mió. kr. Av hesum kann væntast, at útreiðslurnar til at gera støðumetingar og at býta peningin eru á leið 1,5 mió. kr.

2.2. Umsitingarligar avleiðingar fyri land og kommunur
Fyri landið hevur lógaruppskotið nakað av umsitingarligum avleiðingum. Víst verður til pkt. 2.14. Mett verður, at neyðugu umsitingarligu atgerðirnar kunnu fremjast við verandi arbeiðsorku í landsfyrisitingini.

Lógaruppskotið hevur somuleiðis umsitingarligar avleiðingar fyri kommunurnar, sum skulu gera ferðavinnuætlan fyri sítt øki. Partur av ferðavinnuætlanini er at gera skilhaldsreglur fyri tey øki, har tað verður mett neyðugt. Kommunurnar eru ymiskar, og trupult er tí at nágreina, júst hvussu umfatandi umsitingarligu avleiðingarnar fyri kommunurnar fara at verða. Ferðavinnuætlanirnar skulu gerast saman við nevnd, vald eftir § 7 (har slík er), og saman við hagastýrum og festarum, og kommunan skal brúka part av inntøkuni frá gjaldinum at fíggja hetta arbeiðið.

2.3. Avleiðingar fyri vinnuna
Fyri ferðavinnuna hevur uppskotið sum heild positivar fíggjarligar avleiðingar.

Fleiri ferðafólk hava við sær øktar inntøkur fyri bæði flutningsfeløg og gistingarhús, eins og fyri tey, sum fáast við at leiga út um netborin sølutorg, eitt nú Airbnb og booking.com. Inntøkurnar vaksa eisini hjá matstovunum og hjá teimum, sum bjóða *Heimablídni*, hjá teimum, sum selja ferðafólkum upplivingar og túrar, hjá teimum, sum selja ferðavinnuni tænastur, og hjá handlum og heimavirkisfeløgum, sum selja ferðafólkunum vørur, tinganest o.tíl.

Fyri landbúnaðarvinnuna kann ferðavinnan harumframt gerast eitt týðandi ískoyti til tær inntøkur, sum annars fáast av landbúnaði. Ein avleiddur vinningur av hesum er harumframt, at vinnuligt virksemi á útoyggj og í útjaðaranum annars við vælskipaðari ferðavinnu úti um landið kann økjast og skapa lív og trivnað.

Lógaruppskotið hevur ikki umsitingarligar avleiðingar fyri vinnuna.

2.4. Avleiðingar fyri umhvørvið
Lendisvíddin í Føroyum er sera avmarkað, og tað er tískil umráðandi, at farið verður varliga og skynsamt um ta vídd, sum er. Tískil eigur at verða skipað fyri, at ymsu sløgini av virksemi, sum eru í náttúruni, bæði vinnuligt og ikki-vinnuligt virksemi, verða løgd soleiðis til rættis, at allir partar fáa røkt sítt virksemi á skynsaman hátt.

Tað primera vinnuliga virksemið í haganum er landbúnaður, og hetta er í útgangsstøði um alt uttangarðslendi. Undir liðini á hesum er annað vinnuligt virksemi, t.d. el- og telefonleiðingar, transformatorstøðir, vindmyllur og goymslur av ymsum slag. Slíkt vinnuligt virksemi hevur ikki stóra ávirkan á landbúnaðin. Aftur at hesum er ferðavinnuvirksemi, sum – vegna talið av ferðafólkum aleina – kann hava munandi størri ávirkan enn annað vinnuligt virksemi. Skulu ymsu sløgini av virksemi kunna virka lið um lið á sama lendi, er umráðandi, at lendisnýtslan verður løgd væl til rættis. Tá ræður um ferðavinnuvirksemi, kann hetta gerast við at leggja gonguleiðir ella gøtur har, sum ferðslan hevur minst ávirkan, bæði á landbúnað og viðbrekin øki, sum krevja serligt fyrilit. Verður rætt atborið, ber til at skipa ymiskt virksemi lið um lið og á slíkan hátt, at náttúran verður ávirkað sum minst.

Lógaruppskotið hevur ávirkan á umhvørvið, bæði tá ið ræður um náttúruvernd, nátturuumsiting, landbúnað og ferðavinnu, og tað veldst um tær ítøkiligu umstøðurnar, um avleiðingarnar samanumtikið kunnu sigast at vera positivar ella negativar.

Leggjast skal afturat, at tað við náttúruverndarlóggávu ber til at avmarka rættindini eftir hesi løgtingslógini fyri at verja náttúruna.

2.5. Avleiðingar fyri serstøk øki í landinum
Ferðafólk koma fyrst og fremst til Føroya at uppliva ta serstøku náttúruna kring alt landið. Fyri útjaðaraøki, har tað er trupult at fáa fólk at støðast, er ferðavinnan tí eitt gott høvi at fáa vinnuligt virksemi á staðnum. Samstundis kann ferðavinnan verða eitt gott ískoyti til landbúnaðin á staðnum, við tað at ferðavinna og landbúnaður eyðsæð kunnu fáa gagn hvør av øðrum. Í ferðavinnu starvast vanliga lutfalsliga nógvar kvinnur, og hetta kann vera ein fyrimunur, tá ið ræður um útjaðaramenning.

2.6. Avleiðingar fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir
Lógaruppskotið hevur ikki avleiðingar fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir.

2.7. Millumtjóðasáttmálar á økinum
Eingin viðkomandi millumtjóðasáttmáli er á økinum.

2.8. Tvørgangandi millumtjóðasáttmálar
Hoyvíkssáttmálin javnsetur fyritøkur, feløg og persónar við heimstaði í Íslandi við fyritøkur, feløg og persónar við heimstaði í Føroyum. Lógaruppskotið broytir ikki hesi viðurskifti.

Lógaruppskotið verður mett at vera í samsvari við *Evropeiska mannarættindasáttmálan*, sbr. *Anordning nr. 136 af 25. februar 2000 om ikrafttræden for Færøerne af lov om den europæiske menneskerettighedskonvention*, og *Sáttmála Sameindu Tjóða um rættindi hjá einstaklingum, ið bera brek*, sbr. *Bekendtgørelse nr. 35 af 15. september 2006 om rettigheder for personer med handicap*.

Lógaruppskotið verður harumframt mett at vera í samsvari við *UNESCO-sáttmálan um verju av siðaarvi*, sbr. *Bekendtgørelse nr. 2 af 28. januar 2019 om udvidelse til Færøerne af*

UNESCO-konvention af 17. oktober 2003 om beskyttelse af den immaterielle kulturarv og *UNESCO-sáttmálan um vernd av heimsins mentanar- og náttúruarvi*, sbr. *Bekendtgørelse nr. 21 af 5. marts 1980 af konvention af 16. november 1972 om beskyttelse af verdens kultur- og naturarv*.

2.9. Markaforðingar
Ongar kendar markaforðingar eru á økinum. Lógaruppskotið verður ikki mett at elva til markaforðingar.

2.10. Revsing, fyrisitingarligar sektir, pantiheimildir ella onnur størri inntriv
Lógaruppskotið staðfestir rættin at ferðast í náttúruni við ávísum avmarkingum og fyrilitum, og til tess at tryggja, at óheimilað inntriv ikki verða gjørd í henda rætt, ber til at áleggja sekt fyri brot á ávísar ásetingar. Í flestu førum er revsing við sekt ein hóskandi revsing.

Revsing fyri brot á lógina verður ásett sambært reglunum í 10. kapitli í revsilógini, har tað er tilskilað, at tá ið revsingin skal ásetast, skal havast fyrilit fyri, hvussu álvarsligt brotið er. Eisini skal fyrilit havast fyri upplýsingum um lógbrótaran, eitt nú persónligum og sosialum viðurskiftum, viðurskiftum hansara fyri og eftir gerðina og orsøkini til, at brotið er framt. Harafturat skal, tá ið revsing verður ásett, fyrilit havast fyri, um brotið er framt við fíggjarligum vinningi í hyggju, uttan mun til um fíggjarligi vinningurin er fingin ella bert var tilætlaður, sbr. § 51 og § 80 í løgtingslógarkunngerð nr. 8 frá 20. februar 2024 um revsing (Revsilógin).

Lógaruppskotið heimilar, at krøv, sum eru fallin til gjaldingar, t.d. kostnaðurin av at taka burtur ólógligar forðingar, kunnu krevjast inn við panting. Lógaruppskotið hevur ongar ásetingar um fyrisitingarligar sektir, eins og lógaruppskotið ikki ger onnur størri inntriv í rættindi hjá fólki.

2.11. Skattir og avgjøld
Lógaruppskotið áleggur øllum ferðafólkum, 16 ár og eldri, sum koma til Føroya, at rinda eitt burðardygdargjald (sustainability fee), sum er 225 kr.

Inntøkan av hesum gjaldi verður latin kommununum eftir ávísum býtislykli til tess at fíggja kostnaðin av at gera ferðavinnuætlanir og at gera og halda gøtur og farleiðir. Víst verður til serligu viðmerkingarnar til § 15.

2.12. Gjøld
Lógaruppskotið hevur ongar ásetingar um gjøld.

2.13. Áleggur lógaruppskotið likamligum ella løgfrøðiligum persónum skyldur?
Lógaruppskotið áleggur ferðafólkum, sum koma til Føroya, skyldu at rinda burðardygdargjald til tess at fíggja undirstøðukervi o.a., sum er neyðugt fyri at skipa ferðavinnuna so burðardygt sum gjørligt.

Aðramáta áleggur lógaruppskotið hvørki likamligum ella løgfrøðiligum persónum skyldur.

2.14. Leggur lógaruppskotið heimildir til landsstýrisfólkið, ein stovn undir landsstýrinum ella til kommunur?

Landsstýrisfólkið fær heimild til í § 5, stk. 3 at áseta nærri reglur um, hvat innihaldið í eini avtalu um handilsliga ferðavinnu eftir § 3 í minsta lagi skal fevna um.

Landsstýrisfólkið ásetur nærri reglur um innihaldið í ferðavinnuætlanini, eins og landsstýrisfólkið skal góðkenna ferðavinnuætlanina, sum kommunur sbrt. § 6 skulu hava gjørt í seinasta lagi 1. juni 2025.

Landsstýrisfólkið við náttúrumálum kann eftir § 8, stk. 3, áseta nærri reglur fyri, hvussu farast skal fram, tá ið farleiðir verða gjørdar. Her verður serliga hugsað um tilfar og mannagongdir, tá ið gøtur verða gjørdar, so at sami standardur verður brúktur um alt landið.

Landsstýrisfólkið skal góðkenna skilhaldsreglur, sum kommunan í samráð við viðkomandi partar kemur ásamt um sbr. § 9, stk. 2. Skilhaldsreglurnar verða lýstar í kunngerð.

Landsstýrisfólkið fær eftir § 11 heimild at áseta reglur um, at tað í økjum, har tað er serliga vandamikið at ferðast, bara skal vera loyvt at ferðast við staðkendum ferðaleiðara, og at serliga vandamikil øki av trygdarávum skulu vera stongd fyri ferðslu ávísa tíð á árinum ella samdøgrinum.

Landsstýrisfólkið fær í § 12, stk. 4, heimild til at áseta, hvussu avmarkingar í rættinum at ferðast verða almannakunngjørdar.

Landsstýrisfólkið ásetur eftir § 14, stk. 3, nærri reglur um, hvussu fyritøkur, flutningsfeløg havnir o.o. krevja gjaldið inn.

Kommunum verður álagt at gera ferðavinnuætlan fyri sítt øki, og at henda ætlan skal gerast í samráð við heimafólk, hagastýri og festarar og viðkomandi partar, sbr. §§ 6-7. Aftur at hesum skal kommunan, í samráð við bóndan og viðkomandi myndugleikar og stovnar merkja upp farleiðir og gera nýggjar farleiðir, sbr. § 8. Náttúrufyrisitingin skal geva loyvi til, at nýggjar farleiðir og gøtur verða gjørdar. Kommunan hevur ábyrgd av at halda hesar farleiðirnar, eins og tær gomlu bygdagøturnar.

Harumframt kann kommunan gera skilhaldsreglur fyri ávís øki; landsstýrisfólkið skal síðani góðkenna skilhaldsreglurnar og lýsa tær í kunngerð.

2.15. Gevur lógaruppskotið almennum myndugleikum atgongd til privata ogn?
Politiið kann krevja, at ólógligar forðingar sbrt. § 12, stk. 1-2, verða tiknar burtur, og at onnur viðurskifti, sum ikki eru í samsvari við hesa løgtingslóg ella reglur, givnar við heimild í hesi løgtingslóg, verða fingin í rættlag. Verða hesi boð ikki aktað, verður burturtøkan framd fyri ábyrgdarans rokning. Kravið kann krevjast inn við panting.

Aðramáta gevur lógaruppskotið ikki almennum myndugleikum atgongd til privata ogn.

2.16. Hevur lógaruppskotið aðrar avleiðingar?
Lógaruppskotið verður ikki mett at hava aðrar avleiðingar enn tær, ið eru nevndar omanfyri.

2.17. Talvan: Yvirlit yvir avleiðingarnar av lógaruppskotinum

	Fyri landið ella landsmyndug-leikar	Fyri kommunalar myndugleikar	Fyri pláss ella øki í landinum	Fyri ávísar samfelags-bólkar ella felagsskapir	Fyri vinnuna
Fíggjarligar ella búskaparligar avleiðingar	Ja	Ja	Ja	Nei	Ja
Umsitingarligar avleiðingar	Ja	Ja	Nei	Nei	Nei
Umhvørvisligar avleiðingar	Ja	Ja	Ja	Nei	Ja
Avleiðingar í mun til altjóða avtalur og reglur	Nei	Nei	Nei	Nei	Nei
Sosialar avleiðingar			Nei	Nei	

Kapittul 3. Serligar viðmerkingar

Til § 1
§ 1 ásetur yvirskipaða endamálið við løgtingslógini, t.e. at ferðavinna skal vera eitt týðandi íkast til samfelagsbúskapin við at skapa inntøkur, virksemi og trivnað kring landið. Ferðavinnan skal í øllum lutum vera skynsom og burðardygg, og reglur, fyriskipanir o.a., framt eftir hesi løgtingslóg, skulu miða eftir at røkka hesum málum.

Lógargreinin hevur ongan beinleiðis rættarvirknað mótvegis borgaranum, men kann verða ein tulkingartáttur, tá ið aðrar ásetingar í løgtingslógini verða tulkaðar, og vera leiðbeinandi í sambandi við meting.

Víst verður til almennu viðmerkingarnar.

Til § 2
Í § 2 verða ávís hugtøk, sum verða brúkt í løgtingslógini, allýst.

Í nr. 1 verður hugtakið *heimafólkið* lýst. Heimafólkið er fólkið, sum sambært Landsfólkayvirlitinum býr á staðnum. Tað er ikki treyt, at heimafólkið eigur ella hevur um hendur jørð; einasta treytin er, at bústaðurin er í bygdini. Er ivi um, hvussu bygdin, og við tí heimafólkið, verður avmarkað, kunnu t.d. staðseting í mun til restina av teirri natúrligt avmarkaðu bygdini ella postnummar brúkast vegleiðandi.

Í nr. 2 verður hugtakið *handilslig ferðavinna* lýst. Hetta hugtakið skal eftir hesi løgtingslógini skiljast sum frammanundan skipaður túrur, har fyriskiparin tekur ímóti gjaldi fyri túrin. Tann, sum skipar fyri tiltakinum, kann verða likamligur ella løgfrøðiligur persónur. Víst verður til viðmerkingarnar til § 5.

Í nr. 3 verður hugtakið *innangarðs* skilmarkað positivt, og í nr. 4 verður hugtakið *uttangarðs* skilmarkað negativt. Hugtøkini eru sínámillum útihýsandi, soleiðis at lendi, sum ikki er at rokna sum innangarðs, verður at rokna sum uttangarðs og øvut.

Í nr. 5 verður hugtakið *strond* skilmarkað sum rondin, sum myndar markið millum land og sjógv, sbr. E.A. Bjørk: Færøsk bygderet, bd. III, p. 100-101 og 279ff. Breiddin á rondini, har ið loyvt er at ferðast, veldst um tær ítøkiligu umstøðurnar á staðnum, t.d. lendisviðurskifti og brúk.

Nr. 6 nágreinar, at orðið *bøndur* í hesi løgtingslóg fevnir um festibøndur, sum hava jørð í festi, og ognarbøndur, sum eiga jørð. Hugtakið fevnir eisini, eftir umstøðunum, um hagastýrið og røktingarmenn.

Í nr. 7 verður hugtakið *ferðafólk* skilmarkað. Eitt ferðafólk er ein, sum ikki hevur bústað ella fulla skattskyldu í Føroyum, og sum í sambandi við frítíð ella vinnu er burturi frá heimstaði sínum fyribils og í meira enn 24 tímar. Øvut av hesum hevur uppihaldið *í* Føroyum tá eisini karakter av at vera fyribils. Henda allýsing er í høvuðsheitum í samsvari við ta allýsing, sum World Tourism Organization brúkar um hugtakið ferðafólk.

Til § 3
Ásett verður, at við teimum avmarkingum og skyldum, sum eru ásettar í ferðavinnuætlanum sbrt. § 6 hesi løgtingslóg, í reglum, givnar við heimild í hesi løgtingslóg, í øðrum løgtingslógum og lógum, kunnu ferðafólk ferðast til gongu undir egnari ábyrgd á bygdagøtum, uttangarðs og fram við strondini.

Sjálvur rætturin at ferðast á bygdagøtum, uttangarðs og fram við strondini er ikki treytaður av ávísum endamáli, og tí hevur endamálið við ferðingini ikki týdning, so leingi ferðast verður í samsvari við løgtingslógina.

Rætturin at ferðast uttangarðs og fram við strondini er altíð treytaður av, at fyrilit verður havt fyri náttúru, umhvørvi og landbúnaði. Hesi fyrilitini ganga aftur í øðrum ásetingum í løgtingslógini, men ásetingin í § 3 ger greitt, at løgtingslógin ikki hevur til endamáls at viðurkenna nakran rætt at ferðast uttan fyrilit. Rætturin at ferðast í náttúruni skal tí altíð útinnast soleiðis, at náttúra, umhvørvi og landbúnaður uttangarðs og fram við strondini verða órógvað sum minst. Hugtøkini náttúra og umhvørvi skulu í hesum sambandi skiljast breitt og fevna eisini um mentanarminni og mentanarumhvørvi. Víst verður eisini til serligu viðmerkingarnar til § 4 um atburð og § 9 um skilhaldsreglur.

Rætturin at ferðast á bygdagøtum, uttangarðs og fram við strondini er avmarkaður til gongd, og tað er sostatt ikki loyvt t.d. at súkkla, ríða, tjalda, brúka lendisakfar o.tíl. ella at skipa fyri størri tiltøkum, t.d. ítróttarkappingum ella konsertum uttan so, at loyvi frá bóndanum er fingið til hetta frammanundan.

Ásetingin í § 3 er grundleggjandi avmarkað av ferðavinnuætlanum, sbr. § 6, sum skipa ferðsluna í ávísum økjum, men eisini onnur lóggáva kann avmarka ferðslu í náttúruni. Talan er serliga um løgtingslóg um náttúruvernd, sum við friðingarkunngerð kann steingja øki ella avmarka atgongdina at ávísum økjum o.a., men eisini Lov om Hegn og Markfred (girðingarlógin), sum ásetur reglur um, hvussu gangast kann um bø og annað innangarðslendi, løgtingslóg um matvørur, sum við kunngerð ásetur reglur um at verja

drekkivatn, løgtingslóg um djóravælferð, sum ásetur reglur um, at farast skal væl við djórum o.tíl.

Til § 4
Øll ferðsla í náttúruni skal fara fram við virðing og fyriliti fyri náttúruni, umhvørvinum og øðrum virksemi, sum fer fram í økinum. Fólk skulu ansa eftir, hvussu tey ganga, at tey ikki órógva fugl í bútíðini ella skaða tað, ið grør. Somuleiðis skulu øll virða annað virksemi, sum fer fram í haganum, og ansa eftir, at tey ikki órógva t.d. rakstur ella annað gongufólk. Tá ið farið verður av einum stað, skal staðið vera í sama standi, sum tá ið komið varð á tað. Loyvt er at vassa, svimja og spæla sær í vøtnum og áum, um farið verður hóvliga fram.

Ásett verður í stk. 2, at tað er bannað at taka gróður, lívverur, egg, steinar og grót o.a. náttúrugivið tilfar við sær, tá ið ferðast verður uttangarðs. Henda áseting avmarkar ikki rættin hjá bóndanum at gagnnýta síni lunnindi eftir jarðarlóggávuni.

Ásetingin í stk. 3 gevur bóndanum rætt at vísa burtur fólki, sum ber seg fyrilitarleyst at ella er ognini at skaða ella til ampa.

Tað er bara bóndin, sum hevur rætt at brúka burturvísingarrættin. Er talan um felagshaga, er heimildin hjá røktingarmanninum. Hóast skyldan eftir § 4, stk. 1, at hava fyrilit og fara væl um geldur fyri øll, kunnu ferðandi ikki brúka burturvísingarrættin móti øðrum ferðandi.

Burturvísingin kann fara soleiðis fram, at bóndin munnliga biður tann, sum ber seg ólógliga at, um at fara av staðnum. Burturvísingarrætturin eftir hesi lógargrein gevur ikki bóndanum heimild at brúka kropsligt vald ella fremja eina sivila handtøku.

Atburðurin, sum gevur bóndanum rætt at vísa fólki burtur, skal vera fyrilitarleysur ella vera ognini at skaða ella til ampa. Á hesum skilst, at talan skal vera um munandi óansni, og at bara atburður, sum fer um markið fyri tí, sum bóndin má góðtaka, gevur rætt at vísa fólki burtur. Burturvísingarrætturin samsvarar við atburðarregluna í § 4, stk. 1, hóast orðalagið ikki er heilt eins. Brot á kravið eftir § 4, stk. 1, um at hava fyrilit og fara væl um gevur tí bóndanum rætt at vísa fólki burtur eftir hesi lógargreinini. Talan kann eitt nú vera um at órógva ella gera seg inn á djór, at gera burturav sær, ella at fremja herverk Áseta skilhaldsreglur fyri økið, hvat ið verður mett at vera fyrilitarleyst, kann bóndin somuleiðis vísa burtur fólki, sum ikki heldur tær ásettu skilhaldsreglurnar.

Ásetingin er ætlað at virka fyribyrgjandi, og burturvísingarrætturin fevnir undir ongum umstøðum um burturvísing, sum hevði verið ólóglig sjálvtekt eftir § 294 í revsilógini.

Til § 5
Ásett verður, at *handilslig ferðavinna*, soleiðis sum hetta hugtakið er skilmarkað í § 2, bara kann útinnast í samráð við bóndan. Hetta merkir, at er talan um skipaðan túr, har fyriskiparin tekur ímóti gjaldi fyri túrin, skal fyriskiparin hava avtalað hetta við bóndan.

Kravið um, at slíkt virksemi bara kann útinnast í samráð við bóndan, gevur ikki hesum rætt til at nokta fyri slíkum virksemi uttan so, at hetta órógvar annað virksemi, t.d. fjallgongu, eftir § 12, stk. 3, ella at atgongdin at økinum er avmarkað av friðing o.tíl. Kravið gevur heldur ikki bóndanum rætt til at geva fyriskiparum einkarætt at útinna slíkt virksemi.

Bóndin kann kortini altíð krevja, at fyriskiparin hevur gjørt eina avtalu frammanundan. Í avtaluni verða treytirnar fyri at útinna *handilsliga ferðavinnu* ásettar, t.d. hvussu tiltakið verður lagt til rættis á skynsamasta hátt, so annað virksemi verður órógvað sum minst. Avtalan forðar ikki fyri, at bóndin veitir sama fyriskipara aðrar tænastur fyri gjald. Onnur tænasta er í hesum føri skilmarkað sum ein veiting, sum goldið verður fyri, t.d. ein túrur við ferðaleiðara, ein matpakki, parkering ella atgongd at vesi.

Landsstýrisfólkið ásetur nærri treytir um, hvat avtalan í minsta lagi skal fevna um.

Til § 6
Ásett verður, at allar kommunur skulu gera eina ferðavinnuætlan, sum skal fevna um alla kommununa út á kommunumark. Ferðavinnuætlanin skal gerast saman við serstøku nevndini, sbr. § 7, og hagastýrum og festarum.

Ferðavinnuætlanin skal hava til endamáls at menna og fyriskipa ferðavinnuna á staðnum soleiðis, at hon í minst møguliga mun ger seg inn á náttúru, djóralív, heimafólkið, mentan og mentanararv samsvarandi endamáli løgtingslógarinnar. Yvirskipað ber tí til at siga, at ferðavinnuætlanir skulu verja og, har tað er neyðugt, endurbøta náttúruna, tryggja fyrilit fyri náttúruligum, jarðfrøðiligum, mentanarligum og søguligum virðum og tilfeingi, menna trivnað, mentan og vinnumøguleikar á staðnum og órógva landbúnað og annað virksemi sum minst.

Ferðavinnuætlanin skal sum nevnt røkka út á kommunumark, men kommunur kunnu samstarva um at gera ferðavinnuætlanir fyri natúrligt avmarkað øki.

Í ferðavinnuætlanini skal ferðavinnuvirksemið í kommununi greinast og lýsast, eins og gerast skal ein ætlan fyri, hvussu ferðavinnan í kommununi verður ment og fyriskipað á skynsamasta hátt. Við at eyðmerkja tað serstaka á hvørjari kommunu sær, og við at hava greiða fatan av, hvussu ferðavinna á staðnum best verður ment og útint, ber til at leggja ta staðbundnu ferðavinnuna til rættis soleiðis, at hon í minst møguliga mun órógvar fólk á staðnum, samstundis sum hon kann vera til gagns fyri trivnað og menning á staðnum. Væl fyriskipað ferðavinna kann eisini elva til nýggjar inntøkumøguleikar og fleiri størv, men tá krevst, at kommunan er tilvitað um, hvussu ferðavinnan verður útint best møguligt.

Ferðavinnuætlanin er ikki avmarkað í vavi, tí kommunan, saman við heimafólki, hagastýrum og festarum ger av, júst hvussu ferðavinnan best verður ment og útint í júst teirra øki.

Tað er einans í bygdum við færri enn 300 íbúgvum, at serstøk nevnd skal skipast og takast við í arbeiðið við ferðavinnuætlanini. Hetta forðar kortini ikki fyri, at kommunur – innan fyri sítt øki – skipa aðra nevnd, t.d. eina nevnd sum umboðar allar bygdir í kommununi. Ásetingin forðar heldur ikki fyri, at størri kommunur, býir og bygdir í felag skipa nevndir, sum verða tiknar við í arbeiðið at gera ferðavinnuætlanina ella part av henni. Kommunur kunnu eisini gera av at samstarva sínámillum um ferðavinnuætlanir.

Ásett verður, at landsstýrisfólkið ásetur nærri reglur um, hvat ferðavinnuætlanin í minsta lagi skal innihalda. Ferðavinnuætlanin skal í minsta lagi fevna um viðurskiftini, nevnd niðanfyri, ið eru grundleggjandi fyri, um tað yvirhøvur ber til at fara undir at skipa ferðavinnuna á skynsamasta hátt.

Í fyrsta lagi er umráðandi, at almennar farleiðir í kommununi, t.e. farleiðir, har ein og hvør hevur frítt at fara, undir hesum bygdagøtur og aðrar gøtur, og onnur øki, sum eru opin fyri ferðafólki, verða lýstar. Somuleiðis skal kommunan meta um, hvørt tað er neyðugt og skynsamt at gera nýggjar gøtur og farleiðir til almenningin. Nýggjar gøtur kunnu, eins væl og bygdagøtur og aðrar gøtur, beina ferðsluna ta leiðina, sum órógvar annað virksemi, t.d. landbúnaðarvirksemi, sum minst.

Umframt at lýsa verandi og komandi leiðir skal ferðavinnuætlanin eisini lýsa, um ávísar leiðir eru soleiðis háttaðar, at tær av trygdarávum ella verndarávum eiga at vera stongdar fyri almennari ferðslu. Í slíkum førum kann verða talan um at steingja ávísar leiðir ella ávís øki part av árinum ella part av samdøgrinum, t.d. á hávetri í ringum líkindum ella í bútíðini hjá fugli.

Tá mett verður um, hvørt ein leið ella eitt øki eigur at verða stongt fyri almennari ferðslu av trygdarávum, skal gerast ein torleika- og váðameting. Hetta kann gerast við at litmerkja leiðir, t.d. at marka lættar leiðir grønar og truplar leiðir svartar. Givið er eisini, at ávísar leiðir, tó at tær eru almennar, eru so vandamiklar at ganga, at ókunnufólk mugu ikki fara einsamøll. Tá slíkar leiðir umræður, skal kommunan, saman við staðkendum fólkum, meta um, hvørt staðkendur ferðaleiðari er ein treyt fyri at ganga leiðina. Í hesum sambandi kunnu ásetast nærri reglur um krøvini, sum ferðaleiðarar skulu lúka, t.d. krøv um kunnleika til serligu viðurskiftini á staðnum, krøv um útbúgving ella samsvarandi royndir, krøv um trygging o.tíl.

Á ávísum støðum, leiðum og plássum kann harumframt vera viðkomandi at meta um, hvørt tað er neyðugt at avmarka talið av vitjandi, føroyingum sum ferðafólkum. Slíkur stongsil kann vera grundaður á slit, vernd o.tíl., og kann t.d. verða avmarkaður til ávísa tíð á degnum ella árinum. Í slíkum førum skulu náttúrufyrisitingin og aðrir viðkomandi myndugleikar og stovnar takast við í viðgerðina. Verður slík skipan sett í verk, skal hóskandi partur av loyvdari atgongd verða markað fólki, búsitandi í Føroyum.

Aftur at omanfyrinevndu viðurskiftum skal ferðavinnuætlanin fevna um onnur viðkomandi viðurskifti í kommununi, t.d. hentleikar hjá ferðafólki (vesi, dvalarvikar o.tíl.), neyðug átøk, t.d. møguleikar at sleppa av við burturkast, o.a. Tað er kommunan, sum saman við heimafólki, hagastýrum og festarum ger av, hvussu best er at skipa ferðavinnuna á staðnum, og tí kann kommunan seta í verk ábøtur og onnur tiltøk, sum verða mett neyðug. Víst verður eisini til serligu viðmerkingarnar til § 9 um skilhaldsreglur.

Ásett verður í stk. 3, at landsstýrisfólkið skal góðkenna ferðavinnuætlanina. Endamálið er at tryggja, at ferðavinnuætlanin hjá einstøku kommununi er í samsvari við yvirskipaða endamálið við løgtingslógini. Ferðavinnuætlanin skal vera liðug í seinasta lagi 1. juni 2025.

Til § 7

Tá ið kommunurnar gera av og leggja til rættis, hvussu ferðavinnan í kommununi verður ment og útint, er umráðandi, at heimafólkið saman við hagastýrum og festarum verður tikið við. Tað eru hesi, sum fyrst og fremst kenna avleiðingarnar av ferðavinnuni, serliga teirri ferðavinnuni, sum á ymsan hátt kennist innræsin og órógvar fólkið á staðnum, og tí er umráðandi at heimafólkið saman við hagastýrum og festarum verða hoyrd í tilgongdini.

Til tess at tryggja, at veruligt fyrilit verður havt fyri heimafólki og fyri møguligum serligum viðurskiftum á staðnum, skal kommunan seta eina serstaka nevnd at vera sær til hjálpar.

Hetta er serliga viðkomandi í smærri bygdum, og tí verður ásett, at tað í bygdum við 300 íbúgvum ella færri skal veljast slík nevnd. Í nevndini skulu vera í minsta lagi tríggir og í mesta lagi sjey limir, og hesi skulu geva kommununi ráð um, hvussu best er at leggja ferðavinnuna til rættis. Um tað er viðkomandi – um t.d. bygdin er lítil og fólkini fá – kunnu heimafólkini gera av, at fleiri bygdir ganga saman eina nevnd. Slík avgerð verður eisini tikin á grannastevnu.

Ásett verður, at nevndarlimirnir verða valdir millum heimafólkið á grannastevnu, sbr. Lov nr. 170 af 18. Maj 1937 for Færøerne om Grandestævne m.m. Ein og hvør, sum hevur bústað í bygdini, og sum er 18 ár ella eldri, kann stilla upp til nevndina og hevur atkvøðurætt. Tey, sum møta á fundi, hava eina atkvøðu í part, og nevndarlimirnir verða valdir við vanligum meiriluta.

Ásett verður at enda, at uttan mun til ásetingarnar í § 4 í Lov om Grandestævne m.m., sum áseta, at grannastevna skal haldast í januar ella februar, og at mál, sum skulu takast upp á grannastevnu, skulu fráboðast árið fyri, skal sýslumaðurin skipa fyri grannastevnu áðrenn 1. september 2024. Á hesum grannastevnum verður nevndin vald fyrstu ferð.

Eingin starvstíð er sett fyri serstøku nevndina, tí ætlanin er, at nevndin, saman við kommunu og hagastýrum og festarum, skal gera ta fyrstu ferðavinnuætlanina. Tá henda er gjørd, er nevndin liðug við arbeiði sítt. Verður farið undir at endurskoða ferðavinnuætlanina, verður nevndin vald av nýggjum á vanligari grannastevnu. Tað er tá kommunan, sum skal biðja um at fáa málið lagt fyri grannastevnu áðrenn 1. november árið fyri.

Til § 8

Partur av at tryggja, at rúm er fyri bæði landbúnaðarvirksemi og øðrum virksemi uttangarðs, er at hava møguleika fyri at beina ferðsluna ávísan veg ella ávísa leið. Hugsað verður fyrst og fremst um nýggjar farleiðir uttangarðs, sum kunnu leggjast til tey mest vitjaðu støðini, men eisini aðrastaðni, har ferðslan ikki er so nógv, kann verða viðkomandi at leggja nýggjar farleiðir. Partur av at menna nýggjar farleiðir er eisini, at tað á henda hátt verður lættari at spjaða ferðsluna um alt landið. Talan kann kortini eisini vera um at leggja nýggjar farleiðir, sum byrja í bygdum øki. Tá er umráðandi at leggja farleiðina soleiðis, at íbúgvarnir verða órógvaðir sum minst, t.d. við at leggja farleiðina burtur frá húsum. Í tann mun tað er viðkomandi, kann eigari ella brúkari fáa endurgjald fyri mist bit.

Farleiðir og gøtur skulu gerast soleiðis, at tær fella væl í lendið. Hetta merkir, at tað er umráðandi at finna eina hóskandi javnvág millum øðrumegin eina góða farleið, ið er løtt at fylgja, og hinumegin eina farleið, ið ikki er alt ov sjónlig í landslagnum. Hetta kann vera ymist, alt eftir trýstinum á farleiðina og lendið, farleiðin skal leggjast ígjøgnum.

Tað eru kommunurnar, sum hava ábyrgdina av at leggja nýggjar farleiðir og gøtur kring landið. Hetta skal kortini gerast í samráð við viðkomandi myndugleikar, eitt nú náttúrufyrisitingina, fornminnamyndugleikar og umhvørvismyndugleikar, eins væl og bøndurnar, so arbeiðið verður so væl úr hondum greitt sum til ber. Á henda hátt ber til at beina ferðsluna t.d. burtur frá búøkjum hjá fugli og burtur frá støðuføstum seyðafylgjum, so tey ikki verða skotin av haga. Alt eftir hvussu stórt náttúruinntriv talan er um, kann loyvi til at gera gøtur uttangarðs krevjast eftir løgtingslóg um náttúrufriðing. Til tess at tryggja, at farleiðirnar gera seg sum minst inn á lendið og umhvørvið, tær verða lagdar í, verður ásett, at náttúrufyrisitingin skal góðkenna farleiðina. Nattúrufyrisitingin skal einans hava fyrilit fyri

náttúru, lendi og umhvørvi; onnur fyrilit, t.d. møguleikin at reka ferðavinnu, er ikki viðkomandi.

Kommunan ber kostnaðin av at gera nýggjar farleiðir, eins og kommunan hevur ábyrgd av at halda viðlíka farleiðir og gøtur.
Landsstýrisfólkið við náttúrumálum fær eftir stk. 3 heimild til at áseta nærri reglur um, hvussu farleiðir og gøtur skulu gerast, m.a. reglur um tilfar, dygd o.tíl., so tryggjað verður, at ein hóskandi standardur verður brúktur um alt landið.

Tað er umráðandi, at farleiðir eru lættar at fylgja og góðar at ganga, samstundis sum tær falla væl í lendið og ikki broyta eyðkennini við landslagnum meira enn neyðugt. Í hesum sambandi er eisini umráðandi, at farleiðir og gøtur verða gjørdar úr tilfari, sum hóskar til lendið og landslagið. Hetta kann til dømis gerast við at brúka tilfar úr føroysku náttúruni.

Aftur at nýggjum farleiðum og gøtum eru nógvar gamlar bygdagøtur kring landið. Hesar verða í ávísan mun enn brúktar, tó sjáldan til sítt upprunaliga endamál, sum er at hava eina hóskandi farleið millum tvær bygdir, tí nú er landsvegur allastaðni. Ivi hevur verið um, hvørt gomlu bygdagøturnar hava mist sína støðu sum almennar farleiðir, men við hesum uppskoti verður staðfest, at bygdagøturnar eru almennar og lógligar farleiðir, sum øll kunnu brúka.

Løgtingið samtykti 29. oktober 1940 reglugerð um viðlíkahald av varðavegum. Sambært hesi reglugerð hevur kommunan ábyrgd av at halda bygdagøturnar, og onkur kommuna hevur eisini brúkt hesa reglugerð sum heimild at halda bygdagøturnar í kommununi. Mett verður ikki, at reglugerðin er farin úr gildi vegna vantandi brúk (desvetudo), og tað eru tí enn sum áður kommunurnar, ið hava ábyrgdina av at halda hesar gøtur.

Tá ásett verður, at kommunurnar hava ábyrgd av at halda bygdagøturnar, er omanfyrinevnda reglugerð frá 1940 ikki viðkomandi longur, og hon verður tí sett úr gildi. Víst verður til viðmerkingarnar til § 17.

Til § 9
Sambært ásetingini kann kommunan í samráð við bóndan áseta reglur fyri gongdina á støðum, har serliga nógv fólk kemur. Hetta kann m.a. verða gjørt, har vandi er fyri, at náttúran kann vera fyri skaða, ella har trýstið á økið skerjir náttúruupplivingina munandi ella ger tað serliga trupult at reka landbúnaðarvirksemi, um eingi tiltøk verða sett í verk.

Kommunan kann eisini í samráð við heimafólkið áseta reglur fyri atburði innangarðs og í bygdini. Talan kann eitt nú vera um at vísa ferðafólki á ávísar leiðir.

Skilhaldsreglurnar kunnu t.d. avmarka talið á fólki í økinum ella avmarka ferðslu ávísa tíð á samdøgrinum umframt at nágreina hóskandi atburð í økinum. Slíkar reglur kunnu t.d. vera grundaðar á, at økið er viðbrekið við atliti at t.d. lendi, djóralívi ella mentanararvi, ella á onnur staðbundin fyrilit.

Eftir stk. 2 skal landsstýrisfólkið góðkenna skilhaldsreglurnar, m.a. fyri at tryggja, at tær ikki skerja rættindini eftir løgtingslógini meira enn neyðugt eftir teimum ítøkiligu umstøðunum. Skilhaldsreglurnar verða lýstar í kunngerð.

Til § 10

Ásett verður, at er støðan í einum ávísum øki tann, at tað ikki kann brúkast til tað endamál, sum tað varð brúkt til frammanundan, t.d. landbúnaðarendamál, kann tann, sum eigur ognina, krevja, at landið yvirtekur økið móti fullum gjaldi. Er talan um landsjørð, kann í staðin verða talan um endurgjald fyri mista rakstrarinntøku.
Fyrra treytin fyri, at slík yvirtøka kann fremjast, er, at kommunan frammanundan hevur roynt at skipa ferðsluna við skilhaldsreglum eftir § 9, og at hetta ikki hevur rokkið ætlaða endamálinum. Seinna treytin er, at økið skal ikki kunna brúkast til tað endamál, tað varð brúkt til frammanundan.

Áheitan um yvirtøku av lendi eftir hesi áseting verður viðgjørd eftir ásetingunum í Lov nr. 69 af 7. maj 1881 om Forpligtelse til Jords Afgivelse til offentlige Veje, Havne og Landingssteder, samt til offentlige Skoler på Færøerne.

Er talan um festijørð, verður málið avgreitt eftir ásetingunum í løgtingslóg um landsjørð.

Til § 11
Øll ferðsla í haganum kann vera vandamikil, og tí verður altíð ferðast undir egnari ábyrgd. Onkustaðni kann tó vera serliga hættisligt at fara, um ein ikki er staðkendur. Í slíkum førum kann landsstýrisfólkið áseta reglur um, at øll, sum ferðast í økinum, skulu hava onkran staðkendan við sær. Við *staðkendum fólki* verður hugsað um fólk, sum kenna umstøðurnar á staðnum og eru von at ganga har.

Somuleiðis kann tað summastaðni vera vandamikið at ferðast í t.d. myrkri ella hálku, og í slíkum førum kann landsstýrisfólkið eftir stk. 2 steingja økið ávísar tíðir á samdøgrinum ella árinum.

Slíkar avmarkingar eru ikki galdandi fyri tey, sum í landbúnaðarørindum eru í økinum.

Til § 12
Eftir stk. 1 er ikki loyvt bóndanum við gjaldportri o.tíl., við stongsli ella á annan hátt at forða fyri lógligari atgongd ella gera tað trupult hjá fólki at útinna sín rætt eftir løgtingslógini. Hugtakið gjaldportur í hesum høpi fevnir ikki bara um sjálvvirkandi skipanir, men eisini um t.d. postkassar og skelti við boðum um at leggja pening ella flyta pening á kontu. Við stongsli meinast fysisk forðing, girðing, múrur, læst portur ella bygningsverk ella onnur konstruktión, sum ikki slepst framvið.

Um okkurt er at rokna sum ein ólóglig forðing, veldst um endamálið. Til dømis er eitt stik lógligt, um endamálið er at halda seyði innan fyri mark, men ólógligt, um endamálið bara er at gera tað trupult hjá fólki at ganga. Sama er galdandi fyri t.d. skelti, sum sigur frá, at tarvurin er leysur. Skeltið er lógligt, um tarvurin *er* leysur, men ólógligt, um tarvurin ikki er í haganum. Metingin veldst sostatt um, um stongsilin tænir einum grundaðum áhugamáli.

Á orðingini *ella á annan hátt* skilst, at ásetingin ikki bara fevnir um fysiskar forðingar, men eisini annað, sum kann forða fyri lógligum ferðslurætti, t.e. forðingar, sum uttan at vera fysiskar, kunnu fáa fólk at aftra seg við at útinna síni rættindi eftir løgtingslógini, t.d. skelti við teksti sum *Privat ogn, Hundurin er leysur, Tarvurin er leysur* ella *Ferðsla við egnari ábyrgd.* Eins og tá ið talan er um fysiskar forðingar, veldst tað um endamálið, um slík skelti eru at rokna sum ólógligar forðingar.

Forboðið fyri stongslum uttangarðs ber ikki í sær eitt alment galdandi forboð fyri, at ein bóndi við sínum eigararæði kann brúka ella røkta ognina hjá sær og eisini brúka hana á annan hátt innan fyri lógligar karmar. Tað eru forðingar, sum hava til endamáls at sjikanera tey ferðandi, sum verða ólógligar, t.e. gerðir, sum ikki hava annað endamál enn at forða fyri annars lógligari ferðslu á ognini.
Stk. 2 hongur saman við ásetingini í stk. 1, men snýr seg burturav um at kunngera forboð fyri lógligari ferðslu og uppihaldi við skelti ella á annan hátt. Eitt dømi um ein slíkan stongsil kundi verið eitt skelti við áskriftini *Privat jørð, atgongd bannað* ella eitt skelti við eini mynd av einum gongufólki við einum krossi útyvir.

Í stk. 3, 1. pkt., verður ásett, at ein eigari ella brúkari hóast stk. 1-2 kann avmarka ferðslu og uppihald, sum órógvar serligt landbúnaðar- ella veiðuvirksemi, t.d. fjallgongu og haruveiðu, og við skeltum ella á annan hátt kunngera slíka avmarking. Ásetingin fevnir bara um serligt afturvendandi virksemi í haganum.

Eftir stk. 3, 2. pkt., skulu avmarkingar eftir stk. 3, 1. pkt., vera so avmarkaðar sum gjørligt. Í tí liggur, at avmarkingarnar skulu vera proportionellar, bæði við atliti at økisvídd og tíð, og at rætturin hjá fólki eftir lógaruppskotinum skal verða skerdur sum minst.

Í stk. 4 verður heimilað landsstýrisfólkinum at áseta nærri reglur um, hvussu slíkar avmarkingar skulu kunngerast alment. Almannakunngeringin skal gerast soleiðis, at fólk hava ein veruligan møguleika fyri at kanna, um ávíst øki er stongt, og talan verður tí um eina tøkniliga skipan, t.d. kunngering á eini heimasíðu ella á eini app. Aftur at hesum ber eisini til at kunngera stongsilin við einum skelti á portrinum o.tíl.

Eftir § 13 kann politiið krevja, at tann, sum hevur ábyrgd av eini ólógligari forðing eftir § 12, stk. 1-2, t.d. portur, skelti ella fráboðan, tekur hana burtur, sbr. viðmerkingarnar til § 13.

Til § 13
Ásett verður, at politiið kann krevja, at ólógligar forðingar sbrt. § 12, stk. 1-2, verða tiknar burtur, og at onnur viðurskifti, sum ikki eru í samsvari við hesa løgtingslóg ella reglur, givnar við heimild í hesi løgtingslóg, verða fingin í rættlag.

Tá tað í lógini verður ásett, at ávís støð kunnu øll ferðast til gongu, um farið verður fram við fyriliti og hóskandi varsemi, er umráðandi, at ólógligar forðingar ikki verða settar fyri hesum. Forðingar í hesum høpi kunnu vera portur, bummar o.a., men eisini gjaldportur og gjaldstøðir, ið eru ein forðing í lógarinnar høpi, sbr. ásetingina í § 3.

Somuleiðis kann politiið geva boð um, at heilt ella fyri ein part reistir bygningar, stongslar ella aðrar innrættingar, skeltir ella fráboðanir, sum eru ímóti forboði ella boðum eftir løgtingslógini ella reglum, givnar við heimild í lógini, verða tikin burtur. Tann, sum hevur ábyrgdina av ólógligu forðingini, ber kostnaðin av at taka hana burtur.

Vil tann, sum hevur ábyrgdina, ikki taka ta ólógligu forðingina burtur, kann hetta verða gjørt fyri ábyrgdarans rokning. Hetta krav kann krevjast inn við panting.

Til § 14
Ásett verður, at øll ferðafólk, 16 ár og eldri, sum koma til Føroya, skulu rinda eitt burðardygdargjald (sustainability fee).

Ferðafólk sbrt. hesi ásetingini eru tey, sum eru fevnd av allýsingini í § 2, 7: Fólk, sum hvørki hevur bústað ella fulla skattskyldu í Føroyum, og sum í sambandi við frítíð ella vinnu er burturi frá heimstaði sínum fyribils og í meira enn 24 tímar.

Gjaldið er markað til at skipa ferðavinnuna so burðardygt sum til ber. Víst verður til almennu viðmerkingarnar.

Ásett verður somuleiðis, at fyritøkur, flutningsfeløg, o.o., sum flyta fólk til landið (flogfeløg og ferðamannaskip) og havnir, sum taka ímóti cruise-skipum, stuttleikabátum o.tíl., skulu krevja gjaldið inn vegna landið og síðani avrokna tað til TAKS sum ásett í § 1, stk. 3, í løgtingslóg nr. 37 frá 26. mai 1988 um ferðagjald. Landsstýrisfólkið ásetur nærri reglur um, hvussu gjaldið verður kravt inn.

Ásetingin í § 14 kemur í gildi 1. oktober 2024, so stundir eru at skipa praktisku viðurskiftini viðvíkjandi innkrevjingini av gjaldinum.

Til § 15
Burðardygdargjaldið er markað til at gera ferðavinnuætlanir, at gera og halda viðlíka gøtur í haganum, undir hesum eisini bygdagøtur, umframt til onnur átøk, sum skipa ferðavinnuna. Partur kann eisini brúkast til t.d. bjargingarlið ella sløkkilið á staðnum.

Kommunan skal ansa eftir, at hóskandi partur av inntøkuni verður brúktur í teimum bygdum, sum eru undir mesta trýsti av ferðavinnuni. Sum meginregla skal hesin partur brúkast at skipa ferðavinnuna á staðnum, men kommunan kann eisini i samráð við ta serstøku nevndina gera av, at peningurin skal brúkast til onnur endamál, sum kunnu linna trýst og órógv, sum ferðavinnan hevur við sær.

Ásett verður í stk. 2, at kommunan skal stuðla serstøku nevndini eftir § 7 við einum fjórðingi av gjaldinum, so nevndin kann fyrireika ferðavinnuætlanir, átøk og tiltøk, sum skipa ferðavinnuna í bygdini. Eru fleiri serstakar nevndir, sbr. § 7, í kommununi, verður upphæddin býtt javnt millum nevndirnar.

Ásett verður í stk. 3, at kommunan skal stuðla hagastýrum og festarum við einum fjórðingi av gjaldinum, so hesi kunnu fyrireika ferðavinnuætlanir, átøk og tiltøk, sum skipa ferðavinnuna uttangarðs.

Um samlaða upphæddin, sum er ætlað at stuðla ávikavist serstøku nevndini, sbr. § 7, ella hagastýrum og festarum, ikki verður brúkt til fulnar, t.d. tá komið er væl á leið at skipa ferðavinnuna í økinum, kann kommunan brúka avlopið at fíggja gerð og viðlíkahald av farleiðum o.tíl.

Gjaldið, sum verður latið kommununum, verður latið sum ávikavist grundgjald og gjald, sum er gjørt upp eftir tí trýsti, sum ávísa kommunan er undir av ferðavinnuni. Grundgjaldið er 40% av burðardygdargjaldinum. Hini 60% verða býtt eftir tí trýsti, sum ávísa økinum er fyri. Trýstið kann verða mált við at skráseta talið av telefonum á staðnum, og á tann hátt fáast ábendingar um, hvussu trýstið er ymsastaðni í landinum. Talan er um navnleysa skráseting, og tað merkir, at tað ber ikki til at eyðmerkja persónar ella tjóðskap. Tað hevur í hesum sambandi ikki týdning, um partur av teimum, sum ferðast í økinum, eru fólk, sum búgva í Føroyum; tað avgerandi er samlaða talið og harvið eisini samlaða trýstið. Tey 60% verða

sostatt býtt millum kommunurnar soleiðis, at kommunur við lutfalsliga flest ferðafólkum fáa lutfalsliga mest av gjaldinum.

Fyrisitingarkostnaðurin hjá landinum, t.e. serliga at gera støðumetingar og at máta trýstið á náttúruna kring landið, m.a. grundað á ferðavinnuhagtøl og teljingar, verður drigin frá inntøkuni av burðardygdargjaldinum, áðrenn hetta verður býtt millum kommunurnar.

At enda verður ásett í stk. 5, at har gøtur annaðhvørt eru gjørdar ella eru í gerð, verður loyvt tí, sum hevur staðið ella stendur fyri arbeiðinum, at krevja gjald til tess at fíggja kostnaðin av hesi gøtu. Henda áseting fer úr gildi 1. juni 2025.

Ásetingin í § 15, tó ikki stk. 5, sbr. omanfyri, kemur í gildi 1. oktober 2024, so stundir eru at skipa praktisku viðurskiftini viðvíkjandi útgjaldinum til kommunurnar.

Til § 16
Er ikki hægri revsing ásett í aðrari lóggávu, verða brot á § 4, stk. 1-2, § 5, stk. 1, og § 12, stk. 1-2, revsað við sekt.

Við sekt verður somuleiðis revsaður tann, sum ikki heldur skilhaldsreglur, ásettar við heimild í § 9, ella ikki aktar boð eftir § 13, stk. 1.

Ferðafólk, sum ikki aktar boð um burturvísing eftir § 4, stk. 3, verður revsað sbrt. § 264, stk. 1, nr. 2, í revsilógini.

Ásett verður at enda, at tað í reglum, givnar við heimild í løgtingslógini, kann verða ásett, at brot á reglurnar verða revsað við sekt. Somuleiðis verður ásett, at revsiábyrgd kann verða áløgd løgfrøðiligum persónum eftir reglunum í 5. kap. í revsilógini.

Til § 17
Løgtingslógin fær gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd. Samstundis fer úr gildi reglugerð fyri varðavegir frá 29. oktober 1940.

Løgtingið samtykti 29. oktober 1940 reglugerð um viðlíkahald av varðavegum. Ivi hevur verið um, hvørt henda reglugerð framvegis hevur gildi, m.a. tí at varðagøturnar hava mist sín upprunaliga týdning, tá ið vegir vórðu gjørdir millum bygdirnar. Reglugerðin er kortini ongantíð formliga sett úr gildi og má tí metast framvegis at vera í gildi. Í hesi løgtingslógini verður ásett, at kommunurnar hava ábyrgd av at halda varðagøturnar, og reglugerðin frá 1940 er tískil ikki viðkomandi longur. Reglugerðin verður tí sett úr gildi.

Ásett verður í stk. 2, at §§ 14-15 fáa gildi 1. oktober 2024, so stundir eru at fyrireika ávikavist innkrevjingina av burðardygdargjaldinum frá ferðafólkum og útgjaldið til kommunurnar.

Í stk. 2 verður somuleiðis ásett, at § 18 fær gildi 1. januar 2026. Ásetingin er gjørd til tess at tryggja avtalur við ferðamannaskip um komu til Føroya, sum eru gjørdar væl fyri, at lógin fær gildi.

Í stk. 3 verður ásett, at § 15, stk. 5, fer úr gildi 1. juni 2025. Ásetingin er grundað á, at tað í onkrum føri er farið undir arbeiði at gera gøtur við teirri væntan, at tað bar til at fíggja hetta við at taka gjald fyri atgongd. Av tí at hetta ikki verður loyvt, sbrt. § 12, stk. 1, verður mett, at

rættast er at útseta gildiskomuna fyri forboðnum fyri at taka gjald fyri atgongd at gøtum, sum eru gjørdar, ella sum eru í gerð.

Til § 18
Til tess at tryggja, at eisini ferðafólk við cruise-skipum umframt burðardygdargjaldið rinda ferðagjald, verður løgtingslóg nr. 37 frá 26. mai 1988 um ferðagjald broytt soleiðis, at undantakið frá ferðagjaldi fyri hesi ferðafólk verður strikað. Ásetingin fær gildi 1. januar 2026.

Til § 19
Í § 41 í Lov for Færøerne om Hegn og Markfred frá 1937 er ásett, at ongum er loyvt at ganga uttan fyri beina bygdagøtu í haga, har hann ikki er eigari. Henda avmarking í gongurættinum verður avmarkað til ferðafólk, og ásett verður tískil sum nýtt pkt. 2 í § 41, at avmarkingin í § 41, 1. liði, er ikki galdandi fyri íbúgvar landsins, sum tí hava frítt at fara. Víst verður til almennu viðmerkingarnar.

Broytingin í § 42, 1. pkt., er ein avleiðing av broytingini í § 41, 1. liði, og hevur til endamáls at tryggja, at reglurnar um gongd í fremmandum haga í landbúnaðarørindum ikki verða broyttar.

Uttanríkis- og vinnumálaráðið, 7. mars 2024

Høgni Hoydal
landsstýrismaður

/ Herálvur Joensen

Yvirlit yvir fylgiskjøl:
Fylgiskjal 1: Hoyringarsvar frá Heilsumálaráðnum
Fylgiskjal 2: Hoyringarsvar frá Abraham Mikladal
Fylgiskjal 3: Hoyringarsvar frá Almanna- og mentamálaráðnum
Fylgiskjal 4: Hoyringarsvar frá Hvalbiar kommunu
Fylgiskjal 5: Hoyringarsvar frá Jóannes í Dali
Fylgiskjal 6: Hoyringarsvar frá Mads Guttesen
Fylgiskjal 7: Hoyringarsvar frá Klæmint Mittún
Fylgiskjal 8: Hoyringarsvar frá Ragnar Dalsá
Fylgiskjal 9: Hoyringarsvar frá Vestmanna kommunu
Fylgiskjal 10: Hoyringarsvar frá Jógvan Edmund á Geilini
Fylgiskjal 11: Hoyringarsvar frá hagapørtunum í Hvalba
Fylgiskjal 12: Hoyringarsvar frá Fuglafjarðar kommunu
Fylgiskjal 13: Hoyringarsvar frá Kvívíkar kommunu
Fylgiskjal 14: Hoyringarsvar frá Barna- og útbúgvingarmálaráðnum
Fylgiskjal 15: Hoyringarsvar frá Samson Højgaard
Fylgiskjal 16: Hoyringarsvar frá Føroya Ferðaleiðarafelag
Fylgiskjal 17: Hoyringarsvar frá Gurið Lómfelli
Fylgiskjal 18: Hoyringarsvar frá Skúvoyar kommunu
Fylgiskjal 19: Hoyringarsvar frá hagastýrinum fyri hagapartarnar við Gjógv
Fylgiskjal 20: Hoyringarsvar frá Go Local
Fylgiskjal 21: Hoyringarsvar frá hagastýrinum fyri Lítlu Dímun
Fylgiskjal 22: Hoyringarsvar frá Vága kommunu
Fylgiskjal 23: Hoyringarsvar frá Rúna Kruse
Fylgiskjal 24: Hoyringarsvar frá Kjartan Højgaard
Fylgiskjal 25: Hoyringarsvar frá Hovs kommunu
Fylgiskjal 26: Hoyringarsvar frá Slættaneshaga í Sandavági
Fylgiskjal 27: Hoyringarsvar frá Fíu Selmu Nielsen
Fylgiskjal 28: Hoyringarsvar frá Hundaeigarafelag Føroya
Fylgiskjal 29: Hoyringarsvar frá Jógvan Magnussen
Fylgiskjal 30: Hoyringarsvar frá Hallur í Heiðunum
Fylgiskjal 31: Hoyringarsvar frá Føroya Hundaførarafelag
Fylgiskjal 32: Hoyringarsvar frá Fámjins kommunu
Fylgiskjal 33: Hoyringarsvar frá Amandu Gullaksen
Fylgiskjal 34: Hoyringarsvar frá Hvannasunds kommunu
Fylgiskjal 35: Hoyringarsvar frá Sumbiar kommunu
Fylgiskjal 36: Hoyringarsvar frá Porkeris kommunu
Fylgiskjal 37: Hoyringarsvar frá Randi Meitil
Fylgiskjal 38: Hoyringarsvar frá Sjóvinnufelagnum
Fylgiskjal 39: Hoyringarsvar frá TAKS
Fylgiskjal 40: Hoyringarsvar frá Fíggjarmálaráðnum
Fylgiskjal 41: Hoyringarsvar frá Føroya Sílaveiðifelag
Fylgiskjal 42: Hoyringarsvar frá Vága Floghavn
Fylgiskjal 43: Hoyringarsvar frá Dalhaga í Sandavági
Fylgiskjal 44: Hoyringarsvar frá Eysturkommunu
Fylgiskjal 45: Hoyringarsvar frá Herluf Jacobsen
Fylgiskjal 46: Hoyringarsvar frá Viðareiðis kommunu

Fylgiskjal 47: Hoyringarsvar frá Jóhan Dávur Joensen
Fylgiskjal 48: Hoyringarsvar frá Tórshavnar havn, Klaksvíkar havn, Runavíkar havn, Fuglafjarðar havn, Vágs havn og Tvøroyrar havn
Fylgiskjal 49: Hoyringarsvar frá Føroya Óðalsfelag
Fylgiskjal 50: Hoyringarsvar frá Sunda kommunu
Fylgiskjal 51: Hoyringarsvar frá hagastýrinum í Gimbrahaga í Sandavági
Fylgiskjal 52: Hoyringarsvar frá Jóhan Jógvansson og Sonju Dalsgaard Nolsø
Fylgiskjal 53: Hoyringarsvar frá Eiðis kommunu
Fylgiskjal 54: Hoyringarsvar frá Hagafelag Føroya
Fylgiskjal 55: Hoyringarsvar frá Fugloyar kommunu
Fylgiskjal 56: Hoyringarsvar frá Rúnu Hjelm
Fylgiskjal 57: Hoyringarsvar frá Hallgerð Akurstein
Fylgiskjal 58: Hoyringarsvar frá Jóhannu E. Dalfoss og Sonhard E. Dalfoss
Fylgiskjal 59: Hoyringarsvar frá Føroya Náttúru- og Umhvørvisfelag
Fylgiskjal 60: Hoyringarsvar frá Roar Heina Olsen
Fylgiskjal 61: Hoyringarsvar frá Dortheu Joensen og Jenus í Trøðini
Fylgiskjal 62: Hoyringarsvar frá Óluvu Zachariasen
Fylgiskjal 63: Hoyringarsvar frá Kunoyar kommunu
Fylgiskjal 64: Hoyringarsvar frá Bjørn Kalsø
Fylgiskjal 65: Hoyringarsvar frá Útoyggjafelagnum
Fylgiskjal 66: Hoyringarsvar frá Atlantic Airways
Fylgiskjal 67: Hoyringarsvar frá Ásmundi Lassen
Fylgiskjal 68: Hoyringarsvar frá Tórshavnar kommunu
Fylgiskjal 69: Hoyringarsvar frá Richu Richardsdóttir
Fylgiskjal 70: Hoyringarsvar frá Gásadalsgarði
Fylgiskjal 71: Hoyringarsvar frá Jógvan Kruse
Fylgiskjal 72: Hoyringarsvar frá hagastýrinum hjá Suðurhelvt
Fylgiskjal 73: Hoyringarsvar frá Klaksvíkar kommunu
Fylgiskjal 74: Hoyringarsvar frá Ferðavinnufelagnum
Fylgiskjal 75: Hoyringarsvar frá Høgna Hansen
Fylgiskjal 76: Hoyringarsvar frá Umhvørvisstovuni
Fylgiskjal 77: Hoyringarsvar frá Óla A. Reinert á Geilini
Fylgiskjal 78: Hoyringarsvar frá Bóndafelag Føroya
Fylgiskjal 79: Hoyringarsvar frá Kára Klettskarð í Kongsstovu
Fylgiskjal 80: Hoyringarsvar frá Sunnvá Asano
Fylgiskjal 81: Hoyringarsvar frá Ellu Joensen
Fylgiskjal 82: Hoyringarsvar frá Anju og Eyðun Eliassen
Fylgiskjal 83: Hoyringarsvar frá Umhvørvismálaráðnum
Fylgiskjal 84: Hoyringarsvar frá hagapartinum fyri Norðan í Kunoy
Fylgiskjal 85: Hoyringarsvar frá Hotel Føroyum
Fylgiskjal 86: Hoyringarsvar frá Guðrun Zachariasen
Fylgiskjal 87: Hoyringarsvar frá meirilutanum av býráðnum í Sunda kommunu
Fylgiskjal 88: Hoyringarsvar frá Sp/f Faroeway Adventures
Fylgiskjal 89: Hoyringarsvar frá Visit Vágar, Visit Suðuroy í Vági, Fuglafjarðar kunningarstovu og Visit Tórshavn
Fylgiskjal 90: Hoyringarsvar frá Kirkjubøargarði sp/f

Fylgiskjal 91: Hoyringarsvar frá Visit Runavík
Fylgiskjal 92: Hoyringarsvar frá hagapørtunum í Mykinesi
Fylgiskjal 93: Hoyringarsvar frá hagapørtunum í Vestmanna bygd
Fylgiskjal 94: Hoyringarsvar frá Mariu Vang
Fylgiskjal 95: Hoyringarsvar frá Búa Tórgarð Brattaberg
Fylgiskjal 96: Upprit frá Uttanríkis- og vinnumálaráðnum um innkomnar viðmerkingar
Fylgiskjal 97: Stutt upprit frá Uttanríkis- og vinnumálaráðnum um reglugerð fyri varðavegir